# TRIVNAÐARKANNING 2023

## -í fólkaskúlanum í Føroyum



## Frágreiðing og tilmæli

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

TRIVNAÐARKANNING 2023

- í fólkaskúlanum í Føroyum

Frágreiðing og tilmæli

Katrin av Kák, cand.mag. og cand.pæd.psyk.

Námsvísindadeildin - Fróðskaparsetur Føroya

Annika Helgadóttir Davidsen, Ph.d., adjunktur í sálarfrøði

Deildin fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi - Fróðskaparsetur Føroya

Laufey H. Blaasvær, M.S.Sc. í Sosialvísindi og samfelagsplanlegging

Námsvísindadeildin - Fróðskaparsetur Føroya

Erla Olsen, Ph.d., lektari í lívfrøði og náttúrulærufrøði

Námsvísindadeildin - Fróðskaparsetur Føroya

Fróðskaparsetur Føroya 2023

ISBN 978-99918-63-08-5 (pdf-útgáva)

## Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ... 3

Inngangur ... 5

Søguliga gongdin í kanningunum um happing og trivnað í fólkaskúlanum í Føroyum ... 6

1. Niðurstøður og tilmæli ... 7

Tilmæli ... 8

2. Happing og trivnaður ... 10

Stórir skúlar ikki longur betri fyri í mun til happing ... 13

Happing í floksfelagsskapinum ... 14

Upplivaður tryggleiki í felagsskapinum ... 17

Hugsavning, heilsa og skúlafrávera ... 19

Skúlafrávera ... 20

Mátin at skilja trivnað og menning hjá børnum og ungum hevur týdning ... 22

Vandatættir og verjandi tættir ... 23

Samfelagsmenning og tíðarrák ... 23

3. Nøkur skúlaviðurskifti og hvussu næmingarnir fata tey ... 26

Skúlar ymiskan telefonpolitikk ... 27

Tá næmingar kenna reglurnar í skúlanum ... 28

Felagsskapurin í skúlanum ... 29

4. Næmingurin, floksmentanin og undirvísingin ... 31

Um undirvísingina ... 34

Undirvísingarfakini í mun til trivnað ... 37

Hugburður til skúlagongd og úrtøku ... 38

Lærugreinarnar minni týdning og eisini keðiligari ... 40

Floksstøddin hevur ávirkan á arbeiðsfrið ....................................................................45
Hugurin og viljin at læra .................................................................................................47
5. Trivnaðurin hjá einstaka barninum ..............................................................................49
At verða hildin uttanfyri og óttin fyri at verða hildin uttanfyri ............................................50
At boða frá happing ........................................................................................................52
6. Talgildur trivnaður .........................................................................................................55
Talgildur privatfriður........................................................................................................58
Talgilda lívið *er* veruliga lívið ...........................................................................................59
Ein nýggj spælimentan.....................................................................................................61
7. Háttalagið .......................................................................................................................65
Hagtølini...........................................................................................................................67
8. Keldulisti .........................................................................................................................69
Fylgiskjal 1: Myndir ............................................................................................................76
Fylgiskjal 2: Talvur ..............................................................................................................77
Fylgiskjal 3: Tilmælini frá Happing í fólkaskúlanum – ein spurnakannig 2019......................78
Fylgiskjal 4: Kanningarúrslit.................................................................................................81

## Inngangur

Hetta er fjórðu ferð hesi síðstu 16 árini, at kanning er gjørd um happing og trivnað í fólkaskúlanum í Føroyum. Aftur hesuferð er tað Barna- og útbúgvingarmálaráðið (fyrr Mentamálaráðið), sum hevur biðið Námsvísindadeildina um at gera kanningina. Nakað av fyrireikingum hava verið gjørdar millum Nám og Námsvísindadeildina í eitt tíðarskeið, meðan Námsvísindadeildin hevur staðið fyri sjálvari kanningini og viðgerðini av henni.

Endamálið við hesari kanningini er, eins og í teimum undanfarnu, at útvega vitan um vavið av happing í fólkaskúlanum í Føroyum. Hetta veri seg bæði millum næmingarnar og fólkini, sum eru har, og á internetinum, sum jú er partur av gerandislívinum hjá fólkaskúlanæmingum og flest okkum øðrum. Harumframt er endamálið eisini at kanna trivnaðin hjá næmingunum í fólkaskúlanum. Sum nakað nýtt, spyrja vit eisini um didaktisku viðurskiftini í skúlanum og lærugreinarnar, tí tey eru karmur um og viðvirkandi faktorar í trivnaðinum hjá børnunum í skúlanum.

Tað eru aftur næmingarnir í 5., 7. og 9. flokki, sum eru bidnir um at svara spurnakanningini og tí gevur kanningin innlit í perspektivið hjá børnunum av spurdu viðurskiftunum. Hetta, áhugin fyri barnaperspektivinum, er í tráð við Fólkaskúlalógina, serliga § 2, stk. 2, og harumframt Barnarættindasáttmálan hjá ST, sum hevur verið galdandi í Føroyum hesi síðstu 30 árini. Happing og trivnaður eru subjektiv upplivilsi og tí er avgerandi at hoyra frá børnunum sjálvum, hvussu tey hava tað við hesum. Hvussu uppliva børnini tað at vera í skúla?

Eisini hesuferð gingu fýra ár millum kanningarnar, tí tann síðsta varð framd í 2019. Altjóða gransking vísir, at fokus javnt og samt skal setast á happing fyri at átøk og íløgur skulu gera munandi gagn (Hansen & Nielsen, 2020). Gongdin við vavinum av happing í føroyska fólkaskúlanum hevur verið støðugt minkandi við tveimum prosentstigum hvørja ferð allar tær tríggjar undanfarnu kanningarnar, frá 15% í 2007 til 11% í 2019. Vónin var tí, at gongdin við minkingini á tveimum prosentstigum aftur fór at vísa seg í ár í hesari kanningini. Tað vísti seg tó, at samlaða talið av næmingum, sum siga seg verða happaðar er hækkað, soleiðis at prosenttalið í 2023 er 17.

## Søguliga gongdin í kanningunum um happing og trivnað í fólkaskúlanum í Føroyum

Tað var í 2007, at fyrsta kanningin um happing í fólkaskúlanum í Føroyum varð gjørd. Hon varð gjørd eftir spurnarblaði hjá svenska sálarfrøðinginum Dan Olweus, hvørs ástøði um happing í stóran mun er grundað í og treytað av einstaklinginum og hansara íbygdu og íløgdu eginleikum og eyðkennum. Ástøðið hjá Olweus var ráðandi. Hetta er sonevnda einstaklingafatanin av happing.

Eftirfylgjandi vóru kanningar í 2015 og 2019 og so aftur nú í 2023. Øll árini hava tað verið 5., 7. og 9. flokkur, sum eru bidnir um at luttaka í kanningini.

Ástøðiligi karmurin rundan um kanningarnar um happing hevur síðani 2015 verið tann, sum sonevndi eXbus-bólkurin menti gjøgnum áralanga gransking í Danmark í árunum 2007 til 2011 (sí exbus.dk). Hetta er tann sonevnda felagsskapsfatanin av happing, sum skilir happing sum eitt fyribrigdi í bólkum, sum eru merktir av ótryggleika ella ójavnvági. T.v.s. at happing verður fatað sum ein máti at vera saman uppá í einum felagsskapi, sum hevur við sær, at ein ella fleiri verða útihýst (Hansen, 2018). Felagsskapsfatanin er grundað í m.a. sosialpsykologi, sosiologi og antropologi. Hon kann eisini tengjast at teoriini hjá Stern (2020) um sjálvsmenning, sum fer fram alt lívið og sum lýsir, at upplivilsi saman við øðrum eru organiserandi prinsippið í sjálvsmenningini T.v.s., at tað er tað, vit uppliva saman við øðrum, sum ávirkar okkara menning sum menniskju í bæði góðan og ringan mun.

Mentamálaráðið avgjørdi í 2015, at allir skúlar skulu gera eina trivnaðarætlan, sum er í tráð við felagsskapsfatanina av happing (Kák, Biskopstø, og Olsen 2019). Hetta kravið er framvegis galdandi. Felagsskapsfatanin er jú ein uppgerð við einstaklingafatanina av happing, sum nærum hevur verið ráðandi, síðani happing sum fyribrigdi í skúlanum fekk áhuga millum fakfólk fyri góðum 20 árum síðani. Hendan broytingin í fatanini av og hugburðinum til happing tekur, sum allar aðrar broytingar, tíð at festa seg hjá øllum. Tað veri seg hjá leiðslum, lærarum, foreldrum, børnum, felagsskapum og politikarum.

Í hesi frágreiðing taka vit fram høvuðsúrslitini úr trivnaðarkanningini og hava uppskot um tilmæli, ið kunnu vera við til at bøta um trivnaðin í føroyskum fólkaskúlum.

## 1. Niðurstøður og tilmæli

Úrslitini frá trivnaðarkanningini í ár vísa, at gongdin við happing er farin skeiva vegin, tí 17% av næmingunum siga seg vera blivin happað í skúlanum. Meira enn helvtin av næmingunum siga seg ikki vita, hvat ein trivnaðarætlan er, og knappur fjórðingur sigur seg ikki vita, um teirra skúli hevur eina trivnaðarætlan.

Eins og í 2013 vísa úrslitini, at meginparturin av næmingunum dámar væl at læra, tó halda tey ikki tað vera serliga stuttligt at ganga í skúla. Næmingarnir halda lærugreinarnar hava munandi minni týdning nú enn fyri 10 árum síðani, eins og tær eisini verða fataðar keðiligari nú. Næmingatalið í flokkinum hevur ávirkan á arbeiðsfriðin í flokkinum. Næmingar í stórum flokkum siga seg m.a. hava trupult at hoyra, hvat lærarin og hinir næmingarnir siga.

Ábendingar eru um, at tolsemi við ymiskleika í flokkunum er økt. Tó benda tølini eisini á, at næmingarnir keða seg og halda ikki lærugreinarnar hava serliga stóran týdning. Mátin, happing fer fram upp á, flytir seg eisini. Frá at vera meira sjónlig og týðilig – og í summum førum eisini góðtikin atferð fyri bara nøkrum árum síðani, er mátin at happa broyttur. Hann er kanska í nógvum førum vorðin meira sniðfundigur (subtilur) og snildur (manipulerandi). Vitanin um, at happing er skaðilig og hugburðurin um, at happing ikki verður góðtikin, er eisini støðugt meira útbreiddur. Samstundis er pallurin víðkaður, nú sosialu miðlarnir eru partur av gerandisdegnum hjá nærum øllum skúlabørnum. Tað er sjálvsagt tann ynskiliga gongdin, at happing skal minka niður í onki. Bæði tí, at hon er skaðilig fyri tann beinleiðis rakta og umhvørvið. Eisini tí, at læring og trivnaður eru treytað av tryggleika í skúlafelagsskapinum. Tí eru yvirskipaðu trivnaðarkarmarnir á skúlunum av størsta týdningi.

Tilmælini niðanfyri taka støði í neyðugum tiltøkum at seta í verk, sum skjótast fyri at betra um trivnaðin og læringina í føroyska fólkaskúlanum.

## Tilmæli

1. Nám fyriskipar skeiðs-/arbeiðsdagar úti á einstøku skúlunum, sum taka støði í egnum úrslitum frá hesi kanning, og sum arbeiða við felagsskapsfatanini, skúlamentanini og møguligum avbjóðingum og møguleikum hjá einstaka skúlanum. Foreldur og skúlastýri skulu kunnast um úrslit og niðurstøður frá hesum skeiðs-/arbeiðsdøgum.
2. Kanningin vísir, at næmingaráð hava eina góða ávirkan á trivnaðin. Við støði í tí verður mælt til at skúlarnir menna og víðka um virksemið hjá næmingaráðunum, soleiðis at næmingarnir fáa meira beinleiðis ávirkan á skúlan. Hetta er eisini í góðum samsvari við endamál skúlans um at skúla næmingarnir í fólkaræðiligum tilgongdum. Leggjast skal eisini upp til, at næmingaráðini arbeiða og fyriskipa tiltøk tvørtur um floks- og aldursmørk.
3. Kanningin vísir, at betri arbeiðsfriður er, tá floksstøddin er niðanfyri 18-20, hetta vísir seg eisini í samband við at hoyra, hvat lærarin sigur, og hvat hinir næmingarir siga. Tí verður mælt til at floksstøddin skal í mesta lagi vera 20 næmingar.
4. Kanningin vísir, at talgilda happingin er samansett, men vísir samstundis at har eru stór vitanarglopp, tí talgildi heimurin er so samantvinnaður við gerandisdagin. Serstøk kanning um talgildan trivnað í fólkaskúlunum skal setast í verk.
5. Hendan kanningin, eins og tær undanfarnu, snýr seg mest um viðurskifti sum eru tengd beinleiðis at skúlanum, hóast viðurskifti uttanfyri skúlan sjálvandi eisini hava ávirkan á trivnaðin hjá næmingunum. Tí verður mælt til, at næsta trivnaðarkanningin skal vera meira umfevnandi, og har bæði lærarar, foreldur og næmingar fáa høvi at svara spurningum um viðurskifti bæði innan og uttanfyri skúlan.
6. Kanningin vísir, at lærugreinarnar ikki verða mettar líka týdningarmiklar sum fyri 10 árum síðan. Tí verður mælt til, at lærugreinarnar í skúlanum verða styrktar og verða skipaðar, so tær fanga áhugan hjá næmingunum og teir harvið varðveita áhugan at tilogna sær fakliga vitan. Til hetta krevst, at námsætlanirnar verða dagførdar við denti á hóskandi dýpdarlæru og harafturat eftirútbúgving til lærarar, so teir hava dagførda fakliga, felagsskapsmennandi og didaktiska vitan.

7. Fyri at menna fakliga og sosiala arbeiðið hjá lærarunum, verður toymisarbeiðið á skúlunum styrkt, m.a. við vitanargrundaðum skipaðum samstarvshátti sum t.d. co-teaching. Hesin leisturin stuðlar eisini menningini av felagsskapsfatanini í skúlanum eins og í flokkinum.
8. Fyri at fremja um trivnaðin hjá næmingunum og tryggja, at teir hava eitt barna- og ungdómsvinarligt stað at venda sær til, verður mælt til at næmingatænasta verður ment, har lestrarvegleiðing, heilsufrøðingatænastan og aðrar stuðulsskipanir verða samskipaðar, soleiðis at tað altíð er onkur til taks. Mælt verður til at byrja við skúlum við framhaldsdeild, tí hesir longu hava nógvar av hesum tænastum.

## 2. Happing og trivnaður

Støðan er nógv versnað síðani seinastu trivnaðarkanning í 2019. Tá søgdu 11% av næmingunum seg vera fyri happing. Nú siga 17% seg vera fyri happing (Mynd 1). Av hesum siga 3% seg verða happað ofta, sum er meira enn bæði í 2019 og í 2015, tá umleið 2% søgdu seg verða happað ofta.




*Mynd 1: Gongdin av happing, staðfest í trivnaðarkanningum í fólkaskúlanum frá 2007-2023*

Í hesi kanningini eru tveir heldur líkir spurningar, sum spyrja, um næmingarnir hava upplivað happing (spurningur 1.9 og spurningur 6.5 í fylgiskjali 4). Spurningurin 1.9 er tann, sum hevur verið brúktur í kanningunum 2015 og 2019, meðan spurningur 6.5 er nýggjur spurningur í hesum samanhangi, sum gevur møguleika at samanbera við donsk úrslit (Børne- og Undervisningsministeriet, 2023).

Við at samanbera svarini av báðum spurningunum fáa vit eitt sindur neyvari innlit í, hvussu børnini tulka tíðleikan. Sambært hesum, fella svarini til "At tey verða happað ofta" innan fyri tíðarkarmin upp til umleið 14. hvønn dag og tá vit taka tey, sum siga seg verða happað viðhvørt, verður tíðarkarmurin øktur til umleið eina ferð um mánaðin (Talva 1). Telja vit tey saman, sum siga seg verða happað minst eina ferð um mánaðin, er talið 13% (Talva 2).

Talva 1: Títtleiki av happing í skúlanum (Sp. 1.9)

<table>
<tr><th colspan="2"></th><th>Nei</th><th>Ja, viðhvørt</th><th>Ja, ofta</th><th>Ja, fyrr, men ikki longur</th></tr>
<tr><td rowspan="6">Sp. 6.5 Ert tú blivin happað/ur í skúlanum hetta skúlaárið?</td><td>Ja, fleiri ferðir um vikuna</td><td>2%</td><td>40%</td><td>47%</td><td>12%</td></tr>
<tr><td>Ja, umleið eina ferð um vikuna</td><td>9%</td><td>56%</td><td>24%</td><td>11%</td></tr>
<tr><td>Ja, umleið 14. hvønn dag</td><td>6%</td><td>64%</td><td>21%</td><td>9%</td></tr>
<tr><td>Ja, umleið eina ferð um mánaðin</td><td>12%</td><td>49%</td><td>6%</td><td>33%</td></tr>
<tr><td>Næstan ongantíð</td><td>35%</td><td>27%</td><td>1%</td><td>37%</td></tr>
<tr><td>Ongantíð</td><td>80%</td><td>3%</td><td>0,1%</td><td>17%</td></tr>
</table>

Í hesi greining hava vit brúkt spurning 1.9 til greiningarnar, tí vit á tann hátt kunnu vísa til søguligu gongdina hjá okkum sjálvum. Samanbera vit okkara tøl við tey donsku fyri skúlaárið 2022/23, síggja vit, at í Føroyum eru 68%, sum siga seg ongantíð hava verið happað hetta skúlaárið, meðan talið í Danmark er 72% (Talva 2).

Hóast vit hava brúkt ein spurning úr danskari kanning, so vóru svarmøguleikarnir í føroysku kanningini ikki heilt teir somu sum í tí donsku, tí vit hava roynt at finna fram til meira ítøkiliga, hvat er ofta og hvat er sjáldan. Við eitt sindur av fyrivarni fyri, at okkara tulkingar um tíðleika eru eftirfarandi, meta vit tó, at vit síggja eitt nøkulunda eins mynstur sum í donsku fólkaskúlunum. Tó eru tað fleiri í Føroyum, sum sera ofta verða happað (Talva 2).

Talva 2: Títtleiki av happing í skúlanum í Danmark og Føroyum (Sp. 6.5)

<table>
<tr><th></th><th>Danmark</th><th colspan="2">Føroyar</th></tr>
<tr><td>Sera ofta</td><td>2%</td><td>Ja, fleiri ferðir um vikuna</td><td>3%</td></tr>
<tr><td>Ofta</td><td>3%</td><td>Ja, umleið eina ferð um vikuna</td><td>3%</td></tr>
<tr><td rowspan="2">Viðhvørt</td><td rowspan="2">8%</td><td>Ja, umleið 14. hvønn dag</td><td>2%</td></tr>
<tr><td>Ja, umleið eina ferð um mánaðin</td><td>5%</td></tr>
<tr><td>Sjáldan</td><td>16%</td><td>Næstan ongantíð</td><td>20%</td></tr>
<tr><td>Ongantíð</td><td>72%</td><td>Ongantíð</td><td>68%</td></tr>
</table>

Happingin er mest í 5. flokki og minst í 9. flokki, og er hetta sama mynstur, sum vit sóu seinast í 2019. Í 5. flokki siga 24%, at tey hava upplivað happing, í 7. flokki 18% og í 9. flokki er talið av næmingum, sum er fyri happing, komið niður á 9% (Talva 3).





Talva 3: Títtleiki av happing í skúlanum býtt á floksstig (Sp 1.10)

| | Nei | Ja, viðhvørt | Ja, ofta | Ja, fyrr, men ikki longur |
|---|---|---|---|---|
| 5. flokkur | 56% | 20% | 5% | 20% |
| 7. flokkur | 61% | 15% | 3% | 21% |
| 9. flokkur | 68% | 8% | 1% | 23% |

Í kanningini eru sum nevnt tveir beinleiðis spurningar um hvørt tað er happing í skúlanum. Harumframt er ein annar spurningur, sum snýr seg um tað er happing inni í flokkinum hjá næminginum. Eisini har sæst, at støðan er versnað munandi. Happing inni í flokkinum er fráboðað at vera meira enn dupult so ofta í ár sum í 2019. Vøkstur sæst eisini hjá teimum, sum siga happing vera viðhvørt í flokkinum, frá 14% í 2019 til 21% í ár. Leggja vit hesar tríggjar svarmøguleikarnar saman (ja, altíð, ja, sum oftast og viðhvørt), sær tað sostatt út til, at meira enn triði hvør næmingur (32%) upplivir happing at vera inni í flokkinum í ár, meðan knappliga fimti hvør (18%) upplivdi hetta sama í 2019. Tilsvarandi negativ er gongdin í upplivilsinum hjá teimum, sum siga happing er ikki ella ongantíð í flokkinum (Fylgiskjal 4, spurningur 3.1). Tey eru nógv færri í ár (28%) enn í 2019 (43%). Talið av teimum, sum ikki vita, um happing er í flokkinum stendur í stað (umleið 20% bæði árini). Leggja vit svarmøguleikarnar sjáldan, ongantíð og nei saman, er tað umleið helvtin av næmingunum (49%), sum leggja svarini har í ár. Í 2019 vóru tað 10% fleiri (60%), sum løgdu svarini í sjáldan, ongantíð og nei.

Happing er tætt knýtt at trivnaði, og svarini frá kanningini í ár vísa, at 73% av næmingunum svara, at tey trívast væl ella sera væl í skúlanum, meðan 6% svara, at tey trívast illa ella sera illa í skúlanum (Talva 3a).

Talva 3a. Trivnaður í skúlanum

| Hvussu trívist tú í skúlanum? | 2023 | 2019 |
|---|---|---|
| Sera væl | 24% | 38% |
| Væl | 49% | 46% |
| Hvørki væl ella illa | 21% | 14% |
| Illa | 4% | 1% |
| Sera illa | 2% | 1% |

Samanborið við kanningina frá 2019 vísa tølini eina afturgongd í trivnaði, tí talið á teimum, ið siga seg trívast *illa* ella *sera illa* er økt (úr 2% í 6%), meðan talið á teimum, ið trívast *væl* ella *sera væl*, er lækkað (úr 84% í 73%). Mynd 1a vísir eina samanbering av trivnaðinum hjá næmingunum í 2019 og 2023.




Mynd 1a. Trivnaðurin hjá næmingunum í 2019 og 2023.

## Stórir skúlar ikki longur betri fyri í mun til happing

Í kanningunum í 2015 og 2019 var munandi minni happing í skúlum við næmingatali yvir 300 samanborið við skúlar við minni næmingatali. Hetta sæst ikki í hesi nýggjastu kanningini (Talva 4), har eingin týðandi (signifikantur) munur var á skúlastøddunum. Tað kann hava samband við, at svarluttøkan á stóru skúlunum var rættiliga lág. Í 2019 var svarluttøkan 90% av samlaða næmingatalinum, meðan í 2023 vóru tað bert teir miðalstóru skúlarnir, sum rukku so høgari svarluttøku (Talva 5).

Talva 4: Títtleiki av happing í mun til skúlastødd

| | Smáir skúlar 1-99 næmingar | | | Miðalstórir skúlar 100-299 næmingar | | | Stórir skúlar 300 og fleiri næmingar | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2023 | 2019 | 2015 | 2023 | 2019 | 2015 | 2023 | 2019 | 2015 |
| Nei | 64% | 62% | 57% | 59% | 57% | 69% | 63% | 66% | 64% |
| Ja, fyrr | 23% | 21% | 28% | 24% | 28% | 19% | 20% | 26% | 25% |
| Ja, viðhvørt | 10% | 11% | 14% | 15% | 12% | 10% | 14% | 7% | 10% |
| Ja, ofta | 3% | 6% | 4% | 3% | 4% | 2% | 3% | 1% | 1% |

Skúlatalið, sum er kannað, er 38 í ár í mun til 40 í 2019. Lutfalsliga fleiri næmingar, sum hava svarað, ganga í miðalstórum skúlum til hesa kanningina í 2023, samstundis sum tveir stórir skúlar eru samanlagdir síðan 2019, so nú eru bert 8 stórir skúlar í Føroyum. Samstundis eru onkrir smærri skúlar farnir burturav, serliga tí ongir næmingar eru í antin 5., ella 7. flokki, og ein skúli er vorðin miðalstórur (Talva 5).

Talva 5: Skúlastødd og svarluttøka

| | Smáir skúlar 1-99 næmingar | | Miðalstórir skúlar 100-299 næmingar | | Stórir skúlar 300 og fleiri næmingar | | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2023 | 2019 | 2023 | 2019 | 2023 | 2019 | 2023 | 2019 |
| Tal skúlar | 19 | 23 | 11 | 10 | 8 | 9 | 38 | 40 |
| Tal næmingar | 162 | 217 | 605 | 593 | 929 | 1207 | 1696 | 2017 |
| Prosent næmingar | 8% | 11% | 37% | 29% | 55% | 60% | | |
| Tal 5. fl. | 57 | 109 | 204 | 185 | 299 | 370 | 560 | 664 |
| Tal 7. fl. | 65 | 85 | 221 | 216 | 309 | 377 | 595 | 678 |
| Tal 9. fl. | 12 | 13 | 205 | 181 | 322 | 428 | 539 | 622 |
| Svarluttøka | 76% | | 90% | | 79% | | | |

## Happing í floksfelagsskapinum

Tað finst ein fleirfaldað, lang og útdjúpandi allýsing av happing hjá Schott og Søndergaard (2014). Í tráð við hana er eitt boð upp á eina stutta og neyva allýsing av happing frá DCUM (2021, s.1), sum her er endurgivin í okkara umseting:

> *"Happing er gerðir, sum halda einum ella fleiri næmingum uttan fyri felagsskapin, tilvitað ella ótilvitað".*

Harumframt er happing ein máti at skipa felagsskapin uppá, sum inniber, at nøkur eru inni, og nøkur eru úti (Hansen, 2018).

Við støði í úrslitinum av kanningini, ið vísir, at happing er hækkandi og trivnaðurin lækkandi síðani síðstu kanning í 2019, er upplagt at spyrja, hví so er, hvat kann liggja til grund fyri hesum og hvussu kann hendan gongdin skiljast?

Ein næmingur hevur hesa hugleiðing, tá hann endar spurnablaðið, har spurt verður um hann hevur okkurt at viðmerkja um trivnað:

> *"Eg haldi, at tað eru nógv, sum siga, at tey føla seg happað, tá ongin hevur gjørt nakað við ein og eg hevði viljað, at lærarar og børn skulu vita, hvat happing er."*

Ongin kennir mein í annan mans bein, sigur orðatakið, sum í útsøgnini omanfyri sær út til at vera uppfylt. Í felagsskapsfatanini av happing liggur rætturin til ymiskleika og at hava síni upplivilsir og sínar kenslur, uttan at tær skulu metast um av øðrum fólkum rundanum. Veruleikin er tó ikki so eintýddur, tí tað eru næmingar í kanningini, sum boða frá svárari støðu í ikki at fáa hjálpt øðrum næmingum, sum verða happað ella ikki trívast. Ein drongur í 5. flokki sigur soleiðis í eini viðmerking, ið hann leggur afturat sínum svarum:

> *"Onkuntíð 'happa' dreingirnir í okkara flokki genturnar. Eg síggi, at tær eru keddar og so tá eg spyrji tær, siga tær 'nei, nei, tað er einki'".*

Eitt annað dømi upp á onkursvegna at uppliva seg skákmát, sæst hjá hesum næminginum, ið hevur hesa viðmerking um trivnaðin í skúlanum:

> *"Eg veit ikki, hvørjum eg skal royna at hjálpa. Mær ella mínum vini, tí at vit báðar hava problemir við trivnaði."*

Útsagnirnar boða eisini frá, at tað er tørvur á at seta sjóneykuna á felagsskapsfatanina av happing, og hvat liggur í henni og saman at tosa um trivnað, ósemjur og hvat happing er. At viðurkenna upplivilsir og kenslur hjá hvørjum øðrum uttan at døma tær. Hvørji viðurskifti gera seg galdandi, tá happing er ella møguliga er við at taka seg upp? Tað kann vera ilt á at skyna hjá bæði næmingum og lærarum. Tá kann hendan fatanin og frágreiðingin hjá DCUM (2021) vera til hjálpar (Mynd 2):




*Mynd 2: Happingarstøður, egin umseting (DCUM 2021, s. 1).*

Rundingurin illustrerar, at ósemjur og arging er natúrligur partur av gerandisdegnum, og at tað kann loysast ella livast við, uttan at nakar er keddur ella útihýstur, tí her vil mann hvønnannan. Hetta *kann* flyta seg yvir í happilíknandi støður, í miðjuni, sum bera dám av ótryggleika og ikki at vilja onkran. Hevur sosiala samspælið flutt seg yvir í mittasta ringin, skal ikki bíðast við at gera nakað við tað, tí tá er spurningurin bara um tíð, áðrenn ein ella fleiri verða útihýst og happað. Í omanfyristandandi komu vit inn á at arga og at happa. Stutt lýst kann sigast, at tá arging er, vil mann hvønnannan, skapa røring í ella skemta um okkurt. Tá happing er, vil mann ikki onkran og útihýsir viðkomandi (Hansen, 2018).

Lærarablindni er, tá lærarin ikki *sær* happing (Hansen, 2013). Vit hava kanska øll eina ímynding av, at happing er sjónlig, sum t.d. í klassisku dømunum um buksuvatn ella flenninum eftir barninum, sum hevur tjúkkar brillur. Hasi dømini hoyra farnari tíð til, tá tað í onkran mun var sosialt góðtikið at happa. Saman við øktari vitan um skaðiligu árinini av happing flytist mátin at happa uppá. Hetta fremur kodaða atferð, t.v.s. eitt slag av happandi

atferð í ótryggum felagsskapum, sum er soleiðis háttað, at tey innlimaðu skilja boðskapin, meðan tað kann vera ilt hjá læraranum og onkrum næmingum at gjøgnumskoða hesa møguligu happingina. Samanhangskraftin og dynamikkurin í flokkinum eru rakt og hertil krevst bæði forvitni um ítøkiliga einstaklingin og bólkin og vitan um happing og sosialu mekanismurnar í henni.

Helle Rabøl Hansen (2013) vil vera við, at útihýsingarmátarnir eru blivnir meira snúðiligir (subtilir). Í Danmark vísa kanningar soleiðis eina lækking av happing, meðan einsemi er hækkandi. Í Føroyum síggja vit í hesari kanningini øking í happing og lækking í trivnaði.

Tá tøgn er um happing, fær happing rúmd. Roca-Campos et al. (2021) vísir á, at at skapa rúm fyri samtalu og práti millum næmingar og lærarar um mátar at tryggja tryggleika í skúlanum kann viðvirka til at bróta tøgnina um happing. Felagsskapandi didaktikkur leggur m.a. upp til, at felagsskapsfatanin av happing er partur av sjálvari undirvísingini og didaktikkinum, sum m.a. skal innlima næmingaforteljingar og –ávirkan og ymiskleika (Hansen, Rasmussen, og Søndberg 2023). Hetta minnir eisini um relationella og dialogiska tilgongd í undirvísingini, hvørs aðalmál er, at næmingarnir koma til orðanna í undirvísingini (Løw, 2018).

## Upplivaður tryggleiki í felagsskapinum

Sálarfrøðiligur tryggleiki (*psychological safety*) í umhvørvinum er eitt fyribrigdi, sum Edmondson (2019) er komin fram til í sínari áralangu gransking í samstarvandi høpum sum tann mest avgerandi faktorurin fyri trivnað, læring og menning. Edmondson leggur dent á, at tað at vera í einum sálarliga tryggum umhvørvi ikki krevur at vera samdur og fittur og treytaleyst at stuðla alt og øllum, men at vera reiðiligur og hava vilja til bæði at greiða møguligar ósemjur, at læra av ymiskum sjónarmiðum og at hava virðing sínamillum. Viðspælandi faktorar í sálarligum tryggleika í felagsskapum eru reglur, krøv og mannagongdir, sum eru greið, skillig og røkkandi fyri øll.

Hetta er í tráð við vitanina um, at góðar relatiónir millum lærara og næmingar og harafturat mátin, lærarin og skúlin fer um sín autoritet, hevur avgerandi leiklut fyri tryggleikan (Søndergaard 2009; Drugli 2012; Klinge 2018). Í niðanfyristandandi útsøgnini um tað ringasta í skúlanum, kundi tað bent á, at umframt at vera ónøgdur við at skula vera

nógvar tímar í skúlanum, er tað sjálvt bannið um at brúka fartelefon, sum næmingurin eisini er ónøgdur við. Næminginum dámar lærararnar, men við sínari serligu orðing er hann týðiligur um, at hann saknar autoritet:

> *"Nógv for nógvir tímar, fartelefonbann, fittir lærarar, men duga ikki at seta børn upp á pláss."*

Fyri at styrkja um og geva næmingum kunnleika um sálarliga heilsu, hevur lærugreinin "lívsmeistring" verið á skrá í Noregi síðani 2017 (Kunnskapsdepartementet, 2017). Samstundis sum nógv fakfólk meta hetta vera gleðiligt, vísa summi á, at tað eigur at vera umvent. At tað eru lærararnir sum skulu styrkjast í teirra kunnleika og tilvitsku um týdningin av relatiónini. Hetta soleiðis, at lærararnir fáa eitt dyggiligt útgangsstøði og stuðul í at reflektera yvir møtið við næmingin upp á ein systematiskan máta og harvið ikki lata refleksiónina vera upp til (hissinis) meting hjá læraranum (Brandtzæg, Torsteinson, og Øiestad 2017).

Frástøðan millum generatiónirnar hesi síðstu árini er minkað, ungdómurin varar nógv longri í dag, sum t.d. at nú eru bæði ommur, abbar og foreldur á sama festivali sum tey ungu. Hierarkiið millum generatiónirnar er minkað, og børn og ung verða í størri mun spurd, hvat tey halda og vilja. T.v.s. at frá at vera objekt, har tey vaksnu vistu best, er barnið og tey ungu nú í størri mun subjekt, taka sjálvi avgerðir og støðu um ymiskt (Katznelson, Pless, & Görlich, 2022).

Bateman og Fonagy (2019) vilja soleiðis vera við, at rákið við afturgongd í sálarheilsu hjá børnum og ungum í stóran mun skal skiljast í hesum, at tey eru blivin nógv betri før fyri at seta orð á, hvussu tey hava tað. At uppliva mótgongd ella ikki trívast eina tíð er ikki skaðiligt. Tað skaðiliga liggur í at vera einsamallur í og við hesum viðurskiftunum. Teir báðir Bateman og Fonagy vísa eisini á, at hjáveran av øðrum, serliga vaksnum, er avgerandi fyri eginleikan at megna mótgongd hjá børnum og ungum.

Tøgnin, ikki at fáa svar, ikki at hava møguleika at deila við onnur, kundi mint um hugtakið *resonans* hjá týska sosiologinum Hartmund Rosa (2021). Resonansur inniber sveiggj millum einstaklingin og umverðina, innihaldandi kenslur og rørslur, sum ger, at vit fáa flutt okkum og hugsað um tað, vit eru í og kunnu fara í. Rosa vil vera við, at resonansur er týðandi mótvekt til fremmandagerð. Ein slík kann lættliga uppstanda, tá børn og ung

uppliva seg ikki at verða hoyrd og tosað við í nøktandi mun, sum aftur kann elva til sálarfrøðiliggerð (sí mynd 3), sum kann fáa tey at hugsa, at tað er galið við teimum sjálvum. Samfelagsgongdin, nevnd omanfyri, setur krøv til relatiónsførleikan hjá teimum vaksnu. Autoritetsrollan er broytt og tað sær út til at vera ein kampur um at fáa fatur á relatiónini og fakliga uppmerkseminum hjá børnunum (Katznelson m.fl., 2022).

> *"Lærararnir hjálpa ikki, tá man spyr um hjálp. Teir siga bara "Googla tað ella spyr tey, sum hava gjørt tað."*

Útsøgnin her kundi lýst næmingin, sum sambært nýggjari ungdómsgransking hevur brúk fyri læraranum sum autoreti og lærumeistara og sum vil í samband og samtalu við hann (Katznelson, Pless, og Görlich 2022). Somuleiðis lýsir útsøgnin eisini eitt dømi um tørvin á *epistemiskum áliti* millum lærara og næming. Also kravið um *bæði* hetta, at næmingurin upplivir, at lærarin hevur umhugsni fyri og er áhugaður í sær *og* at lærarin er álítandi og hevur kunnleika, sum næmingurin kann læra og fáa gagn av bæði nú og eftirfylgjandi (Wiwe, 2021). Fonagy metir um alstóra týdningin í hesum fyribrigdinum við útsøgnini, at "epistemiskt álit er kongavegurin til læring" (Brandtzæg m.fl., 2017).

## Hugsavning, heilsa og skúlafrávera

Læring og trivnaður hava eisini *hugsavning* og *góða heilsu* sum fortreyt (Fredens 2012; Jeppesen et al. 2020). Harafturat er tað ein sannroynd, at útbreiðslan av *skúlafráveru* er í øking eisini í Føroyum (Skúlablaðið, 2022). Hesi viðurskiftini spyrja vit næmingarnar um í kanningini 2023 fyri fyrstu ferð.

Tað eru 39% av næmingunum, sum sera ofta ella ofta siga seg *fáa hugsavnað seg í tímunum*. Umleið tað sama talið sigur seg fáa hugsavnað seg viðhvørt, nevniliga 37%. Síðani eru tað 15%, sum siga seg sjáldan fáa hugsavnað seg og 5% ongantíð.



Tilsamans 15% av næmingunum hava sera ofta ella ofta *ilt í búkinum, tá tey eru í skúla*. 24% hava tað viðhvørt, meðan 58% tilsamans siga seg sjáldan ella ongantíð hava ilt í búkinum, tá tey eru í skúla.




*Ilt í høvdinum, tá tey eru í skúla* siga tilsamans 23% seg hava sera ofta ella ofta. 25% hava viðhvørt ilt í høvdinum og 50% sjáldan ela ongantíð ilt í høvdinum, tá tey eru í skúla. Orsøkin til at spurt verður um hesi viðurskifti er tí bæði høvuðspína og ilt í búkinum kunnu vera ávaringartekin um byrjandi skúlafráveru (Korsgaard, 2020).

## Skúlafrávera

Knage (2023) er ein av teimum mongu, sum granskar í skúlafráveru. Hon vísir á útsøgn hjá Linnéa Bodén, sum eisini granskar í skúlafráveru, at "at fara í skúla verður fatað sum sosialur góði og tískil verður skúlafrávera skilt sum frávik hjá einstaklinginum".

Knage førir fram, at vit skulu hava áhuga í og greina sosiala fyribrigdið áhaldandi skúlafrávera (*persistent school absence*) og hvørji samsett viðurskifti gera seg galdandi í tí, soleiðis at vit ikki koma til at framleiða áhaldandi (skúla-)fráverandi børn. Also eina greinandi tilgongd, sum hóskar til óframsigiligar og alla tíðina skiftandi støður, sum kann geva innlit í, hví tað gevur meining at halda seg burtur frá skúlanum. At fáa positiónina sum tann, sum ikki kemur í skúla ella tann, sum verður happaður, setur barnið í eina svára støðu. Trupulleikin kemur til at snúgva seg um barnið og harvið verður trupulleikin í umhvørvinum yvirsæddur (Lund, 2021).

Tá vit leita eftir svarinum og frágreiðingini í barninum, forsterkast problematikkurin, og tað kemur til at snúgva seg um einstaka barnið og møguligar vansar ella brek í barninum. Vansin við at leita eftir forklároing upp á fráveru í barninum er, at barnið verður enn meira

marginaliserað. Jú meira trupulleikin, t.d. happing, einsemi ella vantandi orka, fyllir ella versnar hjá barninum, jú meira økist tørvurin hjá barninum at halda seg burtur frá skúlanum. Tá tað gevur meining at velja skúlan frá, má forvitnið bæði setast á tað og harumframt viðurskifti, sum kunnu viðvirka til at velja skúlan til. Hetta soleiðis, at tað aftur gevur meining fyri barnið at vera í skúla.

Fylgjurnar av bæði áhaldandi skúlafráveru og áhaldandi happing kunnu knýtast til *skúlasorg.*Tað er eitt hugtak hjá Helle Rabøl Hansen, sum lýsir støðuna, tá ein næmingur formliga er partur av flokkinum ella felagsskapinum, men sosialt og mentanarliga ikki er íroknaður, telur ikki við og hetta er áhaldandi. Líðilsi í tí stilla, uttanfyriskapur. Hetta at hava mist tað, sum kundi verið í skúlagongdini, t.d. at hava ein vin, at fáa viðurkenning fyri tann, ein er (Kofoed og Hansen 2018).

Hesi síðstu árini hevur verið eitt rák við hesum ikki at fara í skúla (Skúlablaðið, 2022). Tí spurdu vit í 2019: *Kemur tað fyri, at tú ikki fert í skúla?* Tann orðingin var óivað heldur varin og opin, og tí hildu vit okkum ikki fáa nóg nógva vitan um hetta nýggja fyribrigdið at velja skúlan frá. Tað veri seg, tí barnið ikki orkar, tímir, torir, megnar ella annað. Møguliga hekk tað eisini saman við, at vit onki høvdu at samanbera við, tí vit ikki hava spurt um hetta í farnum kanningum.

Í kanningini í ár, settu vit forkláring á spurningin, soleiðis at hann ljóðar soleiðis: *Kemur tað fyri, at tú ikki fert í skúla, hóast tú ikki ert sjúkur?* Hetta, tí at sjúka er einasta loyvda grundin til fráveru í skúlanum. 49% siga nei til hetta, meðan 25% siga ja, viðhvørt og 3% siga ja, ofta.




Vit geva eisini næmingunum møguleika at greiða frá, hví tey ikki fara í skúla, hóast tey ikki eru sjúk. Her valdu 264 næmingar at greiða frá, hví tey ikki fara í skúla, 106 dreingir og 158 gentur. Hesi svarini kunnu býtast í tvær ymiskar yvirskipaðar orsøkir ella frágreiðingar til at

velja skúlan frá. Í minni mun siga næmingarnir orsøkir vera í *ytri viðurskiftum* og tá í flestum førum lækni/tannlækni, ferðast og skúlaviðurskifti so sum lærarin ella framløgur. Í størstan mun sigast orsøkirnar vera í *innaru viðurskiftum* og tá í høvuðsheitum vantandi orka, harnæst strongd, svøvntrupulleikar og kenslan ikki at hava tað gott.

Vit spurdu eisini, um *tað kemur fyri, at tú heldur teg burtur frá onkrum tímum, tí tú ikki orkar at vera har*. Hetta fyri at vita, um tað eru tekin um lyndi til at halda seg frá at fara í skúla. Her søgdu 62% tað ikki koma fyri, meðan 26% søgdu tað koma fyri viðhvørt og 6% søgdu tað koma ofta fyri. 6% søgdu tað vera komið fyri fyrr, men at tað ikki longur var so.

## Mátin at skilja trivnað og menning hjá børnum og ungum hevur týdning

Tá vit tosa um menning hjá børnum og ungum, er neyðugt at síggja og skilja hesa menning sum eina samansetta og dynamiska tilgongd, har barnið og tann ungi altíð mennist í samspæli við umhvørvið (Sommer, 2018).

Danski sálarfrøðingurin Svend Brinkmann (2015) tosar um tvey hugtøk, ið gera seg galdandi, tá vit skulu skilja samleikamenning: *Samsvar* og *samanhang*. Samsvar snýr seg um, at hvørji vit eru, er eyðmerkt av, hvørji virði vit royna at fáa okkara tilveru at samsvara við. Samanhangur snýr seg um, hvørji vit eru, og er eyðmerkt av einum ávísum samanhangi í søgugongdini, ið setir karmarnar um okkara tilveru. Samleikamenningin er eisini tengd at einari ávísari tulking hjá okkum sjálvum um, hvørji vit eru. "Eg er ein, sum klári meg væl í skúlanum", "Eg eri sosial/ur", "Eg toli ikki nógv av", "Eg eri ein ítróttagenta", "Eg dugi ikki væl at rokna", o.s.fr., eru orðingar og niðurstøður, vit kunnu hoyra frá teimum børnum og ungum, vit eru rundan um í tí dagliga. Hesar tulkingar eru í stóran mun tengdar at teimum tulkingum, sum nærumhvørvið (børn og vaksin) bjóðar barninum/tí unga, eins og samfelagsligir normar og vanar eisini ávirka tulkingina hjá einstaka barninum.

Samfelagsligir normar um *góða barna- og ungdómslívið* kunnu t.d. hugsast at hava ávirkan á tey val, foreldur og børn/ung taka. Dagsins barna- og ungdómslív er fjøltáttað, tá talan er um teir tættir, ið kunnu hava jaliga og neiliga ávirkan á børn og ung, og tí er umráðandi at hava júst fjøltættið fyri eygað, tá vit tosa um menning og trivnað hjá børnum og ungum. Umframt at liva í egnum kroppi, er barnið aloftast eisini partur av eini familju, vinarløgum, dagstovnum og skúla, umframt samfelagnum (Sommer 2018). Barnið er tí

ongantíð einsamalt og óávirkað av nær- og fjarumhvørvi, eins og felagsskapsfatanin av happing eisini leggur upp til.

### Vandatættir og verjandi tættir

Sálarfrøðin hevur í mong ár kjakast um týdningin av vandatættum og verjandi tættum, tá tað snýr seg um sálarsjúkur og aðrar sálarligar trupulleikar. Yvirskipað kunnu vandatættir lýsast sum tey eyðkenni, ið økja um vandan fyri mistrivnaði, meðan verjandi tættir eru tey eyðkenni, ið fremja um mótstøðuførið móti mistrivnaði av einumhvørjum slag (Harder m.fl., 2008). Hesir tættir eru í tøttum samspæli við hvønn annan, og tí kann vera trupult at staðfesta júst hvat elvir til menning og góðan trivnað, og hvat elvir til mistrivnað hjá børnum og ungum  (Harder et al. 2008; Katznelson, Pless, og Görlich 2022; Sommer 2018).

Tó vísa bæði ástøði og gransking um góða menning og trivnað hjá børnum og ungum, at m.a. einsemi og happing, vánalig fíggjarstøða, trupulleikar í familjuni og trýst av ymsum slag eru vandatættir, um teir ikki verða handfarnir í góðari tíð. Verjandi tættir so sum faklig viðurkenning og stuðul, atgongd til góðar sosialar felagsskapir, fíggjarligt og kensluligt yvirskot í familjuni o.s.fr. kunnu mótvirka, at mistrivnaðurin gerst álvarsamur (Bengtsson et al. 2019; Katznelson, Pless og Görlich 2022; Kragesteen 2019 ; Spinhoven et al. 2011).

### Samfelagsmenning og tíðarrák

Samfelagsmenningin seinastu árini kann, sambært fleiri granskarum, vera ein táttur, ið ávirkar barna - og ungdómslívið. Summir teirra leggja dent á, at trýstið á einstaklingin um at avrika er stórt, ferðin í samfelagnum er høg, og tað kann hava neiliga ávirkan á trivnaðin hjá børnum og ungum (Kelly 2007; Lemke 2001; Madsen 2018; Rosa 2003). Katznelson og fl. (2022) skjóta upp 3 tíðarrák, ið kunnu ávirka menning og trivnað hjá børnum og ungum: *Ferðøking*, *avrik* og *sálarfrøðiliggerð (“tempo”, “præstation”, “psykologisering”,* sí mynd 3).

Ferðøkingin sæst aftur nógvastaðni í samfelagnum. Norðurlendska skúlaskipanin er t.d. seinastu árini vorðin alt meiri lagað eftir einstaklingstørvi, har dentur verður lagdur á ferð, tíð og dugnaskap (Carlgren et al. 2006; Katznelson et al. 2022; Sommer 2018; Volckmar 2019). Knýtt at dugnaskapi er sokallaða avriksmentanin, har børn og ung kunnu uppliva, at tey skulu avrika og helst vera best/ur í teimum samanhangum, har tey ferðast: Í

skúlanum, í frítíðarítrivum og – ikki minst – á sosialum miðlum (Katznelson et al. 2022; Madsen 2018; Monika Mohr et al. 2023; Skaale og Davidsen 2017). Góða barna- og ungdómslívið snýr seg ikki longur um at finna sær eitt pláss á rókini, har tú kanst liva eitt nøktandi lív, men at finna *besta* plássið *ovast* á rókini. At leggja so stóra áherðslu á einstaklingin kann hótta treytirnar fyri góða felagsskapinum, ið er av avgerandi týdningi fyri menningina og trivnaðin hjá børnum og ungum. Sálarfrøðilig-gerðina skilja Katznelson et al. og aðrir granskarar sum ein hátt at skilja trivnað hjá børnum og ungum, har sálarfrøðiligur og psykiatriskur málburður verður nýttur til at tosa um mótgang ella trupulleikar, og sum hevur vandan við sær, at vanligar sálarligar reaktiónir verða sálarfrøðilig-gjørdar og psykiatriseraðar og harvið sjúkliggjørdar, hóast tær í veruleikanum ikki eru tað (Brinkmann 2017; Katznelson et al. 2022; Madsen 2018).




*Mynd 3: Umsett úr Katznelson et al. (2022, s. 176).*

Hesi trý tíðarrákini verða her nýtt til at skilja tættir, ið ávirka menning og trivnað hjá børnum og ungum, men tíðarrákini ávirka eisini umhvørvið rundanum, tí at bæði foreldur og yrkiskøn eru – sum partur av sama samfelag – ávirkað av somu mekanismum, tó at tað ivaleyst hevur eina øðrvísi ávirkan á vaksin enn á børn og ung. Mekanismurnar ella tíðarrákini síggjast m.a. aftur í foreldraleiklutinum, har krøvini, m.a. um at avrika sum foreldur, kunnu vera trupul at liva upp til (Akselvoll, 2022). Á sama hátt eru avrikskrøvini til fólkaskúlalæraran hækkað munandi, har serliga ábyrgdin hjá flokslæraranum er stór, tí flokslærarin hevur ábyrgdina av, at tann einstaki næmingurin mennist og trívist, at

felagsskapurin í flokkinum hevur tað gott, og at samskiftið við foreldur, skúlamyndugleikar og ráðgevandi stovnar er gott (BÚMR, 2023).

## 3. Nøkur skúlaviðurskifti og hvussu næmingarnir fata tey

Vitan hjá børnunum um formligu viðurskiftini í skúlanum eru viðvirkandi til at skapa struktur og tryggleika í skúlanum, sum aftur ávirkar trivnaðin hjá teimum. Vit spyrja um fýra formlig viðurskifti í ár: Reglur fyri nýtslu av fartelefon, trivnaðarætlan, næmingaráð og AKT-lærara. Trý tey fyrstu viðurskiftini vórðu fyrstu ferð spurd um í 2019, meðan spurningurin um AKT-lærara er nýggjur í ár. Svarmøguleikarnir eru nuanseraðir eitt sindur í ár, soleiðis at "Veit ikki" nú er koyrt í tvíningar "Veit ikki, hvat tað er" og "Veit ikki, um skúlin hevur tað".




*Mynd 4: Sp. 2.1: Í okkara skúla hava vit (vel eitt svar fyri hvørja reglu). Í myndini eru %-vísu svarini "veit ikki, hvat tað er" og "veit ikki, um skúlin hevur tað" løgd saman.*

Um *reglur fyri nýtslu av telefon* siga 82% seg vita, at skúlin hevur slíkar (Mynd 4, Talva 6). Í 2019 vistu 88%, at skúlin hevði reglur fyri telefonnýtslu. 6% siga, at skúlin ikki hevur slíkar reglur og tað er nøkulunda tað sama sum í seinastu kanningini. Í 2019 vóru ábendingar um, at onkrir næmingar ikki skiltu, hvat reglur fyri nýtslu av fartelefon var. Tískil viðmerktu vit í ár í klombrum, at hetta er telefonpolitikkur. Hóast tað, siga 10% seg ikki vita, hvat reglur fyri nýtslu av fartelefon er. Hesin svarmøguleikin var ikki síðst. Svarmøguleikin "veit ikki" í 2019, har 6% av næmingunum settu sítt svar, er í ár broyttur til "veit ikki, um skúlin hevur tað" og har hava 3% sett kross.

Av tølunum sæst, at tað er rættiliga ymist, hvussu væl skúlarnir kunna um sín telefonpolitikk, tí spjaðingin er frá 61-96% av játtandi svarunum um, hvørt skúlin hevur

reglur fyri nýtslu av fartelefon. Í kanningini er ikki spurt útgreinandi um, hvørjar reglur skúlin hevur fyri telefonnýtslu.

Talva 6: Telefonreglur býtt á floksstig

| | | 5.fl | 7.fl | 9.fl | Øll |
|---|---|---|---|---|---|
| Í okkara skúla hava vit reglur fyri nýtslu av fartelefon | Ja | 66% | 86% | 92% | 81% |
| | Nei | 9% | 6% | 3% | 6% |
| | Veit ikki, hvat tað er | 20% | 7% | 3% | 10% |
| | Veit ikki, um skúlin hevur tað | 5% | 2% | 2% | 3% |

Snildtelefonin (*smartphone*) hevur fingið vaksandi leiklut og ávirkan á gerandisdagin hjá børnum síðani 2019. Tað er ein sannroynd, at telefonin fyllir nógv og kann eisini skapa órógv í tímunum og fríkorterunum. Tí er tað merkisvert, at vitanin hjá næmingunum um telefonreglur er minkandi við 6%.

## Skúlar ymiskan telefonpolitikk

Staðfestast kann, at flestu skúlar hava okkurt slag av telefonpolitikki, men tað er helst ymiskt, hvussu reglurnar eru. Í svari til 52a-fyrispurning um fartelefonir í fólkaskúlanum svaraði landsstýrismaðurin í mai 2023, at arbeitt verður við at gera vegleiðandi reglur fyri fartelefonnýtslu í skúlanum, men ætlanin er ikki at seta forboð fyri nýtslu. Víst verður samstundis á, at ongar ítøkiligar kanningar eru gjørdar av, um fartelefonin er ein avbjóðing í fólkaskúlanum, men at í kanning um happing og trivnað í fólkaskúlanum er víst á, at fartelefonirnar verða brúktar í happingarhøpi, og at í frágreiðing til aðalorðaskifti um fólkaskúlan í 2018 varð víst á, at næmingar gerast bundnir av serliga fartelefon og teirra spæli og samskifti á sosialum miðlum (Løgtingið, 2023).

Sum fyrispurningurin á tingi vísir, so er stór ørkymlan í skúlaskipanini um ávirkanina av fartelefonum og er hetta sama rák, sum vit eisini síggja í okkara grannalondum, har eisini røddir eru frammi um at seta forboð fyri fartelefonum í skúlanum, samstundis sum aðrar røddir tosa um, at neyðugt er at virka fyri talgildisbúgving, soleiðis at næmingarnir eru førir fyri at møta avbjóðingunum í einum talgildum samfelag.

## Tá næmingar kenna reglurnar í skúlanum

*Trivnaðarætlan* eru tað 15% av næmingunum, sum siga, at skúlin hevur. Hetta er meira enn helvtina minni enn í 2019, tá 40% skrivaðu, at skúlin hevði eina trivnaðarætlan. 6% siga í ár, at skúlin ikki hevur eina, meðan tað vóru 5%, sum síðst svaraðu nei. 51% siga seg í ár ikki at vita, hvat trivnaðarætlan er og 28% siga seg ikki vita, um skúlin hevur eina. Hesir báðir svarmøguleikarnir vóru sum nevnt ikki í kanningini í 2019. Tá svaraðu 63% "Veit ikki" um trivnaðarætlan í teirra skúla.

BÚMR setti sum krav í 2015, sum fyrr nevnt, at allir skúlar skulu hava eina trivnaðarætlan, sum allir partar í skúlanum skulu kenna og sum skal liggja á heimasíðuni hjá skúlanum. Sindur meira enn helvtin av spurdu næmingunum siga seg ikki vita, hvat ein trivnaðarætlan er. Og meira enn helvtina so fáir næmingar í ár, 15%, vita, um skúlin hevur eina.

Hugtakið og fyribrigdið trivnaðarætlan sær soleiðis út til at treingja til at verða brúkt og viðgjørt í skúlanum og ítøkiliga innihaldið í trivnaðarætlanini á breddan í skúlanum. Tað er í trivnaðarætlanini, at virðini í skúlanum verða lýst og viðgjørd, herundir m.a. rættindi og skyldur hjá næminginum og mannagongdir fyri sosialu reglurnar á staðnum. Tá næmingurin kennir hesi viðurskifti, verður tað einfaldari fyri hann at navigera í skúlanum og viðvirkar til tryggleika. Í øðrum lagi er avgerandi at hava eitt hugtak fyri trivnarreglur, sum øll kenna og brúka.

*Næmingaráð* siga 86% av næmingunum, at skúlin hevur. Hetta er ein øking á 22%. 9% siga seg ikki vita, hvat næmingaráð er. Kanningin vísir ein samanhang millum trivnað og vitan um næmingaráð, soleiðis at størri partur av teimum, sum trívast væl, eru eisini vitandi um at skúlin hevur næmingaráð.



**22%**

fleiri næmingar í 2023 enn í 2019 siga seg vita, at tey hava eitt næmingaráð

Demokratiski rætturin hjá næmingunum er soleiðis markant styrktur síðani 2019, og sjóneykan kann við fyrimuni setast á fyribrigdið næmingaráð, soleiðis at eisini tey knapt 10% av næmingunum, sum ikki vita, hvat næmingaráð er, eru kunnaðir um tað organið og teirra møguleika at fáa ávirkan á skúlalívið. Næmingaráðini síggja út til at virka á flestu skúlunum, og tí er tað eitt gylt høvi at seta trivnaðarætlanina á skrá í næmingaráðunum og gjøgnum limaumboðanina har útbreiða kunnning um hana víðari út í allar flokkar. Har kann trivnaðarætlanin síðani viðgerast, soleiðis at hvør næmingur sær fær innlit í trivnaðarætlanina og ávirkan á, hvussu hann skal síggjast aftur í flokkinum.

Sama er galdandi fyri telefonreglur. Gransking vísir, at børn í størri mun taka undir við avgerðum, tá tey eru hoyrd og inndrigin (Korsgaard, 2020). Týðiligar reglur, sum børnini kenna og sum tey vilja taka medábyrgd av, eru viðvirkandi til at skapa tryggleika. Alt hetta fremur eisini epistemiska álitið, sum er avgerandi fyri at kenna seg væl og ynsktan í skúlanum, sum aftur ávirkar motivatiónina.

Enn betur fyri viðspæl og undirtøku frá næmingasíðu í at skapa møguliga nýggjar normar, er at eggja næmingarnar til sjálvar at tosa um, viðgera og avgera nýggjar normar ella reglur (Hansen et al. 2023). Hetta er fremjandi fyri felagsskapin, tí børnini og tey ungu hvør sær við hesum fáa ávirkan og eru ikki noydd til at skula tilpassa seg, vera objekt. Sambært Brinkmann (2011) er felagsskapur nakað, sum alla tíðina tekur skap gjøgnum gerðir hjá tí einstaka.

*AKT-lærara* vita 21% av næmingunum, at skúlin hevur. 64% vita ikki, hvat tað er, meðan 13% ikki vita, um skúlin hevur ein. Hetta kundi møguliga hingið saman við, at tað í størri mun eru lærararnir, sum samstarva við AKT-læraran heldur enn næmingarnir sjálvir.

### Felagsskapurin í skúlanum

Vit hava í spurnablaðnum 2023 fyri fyrstu ferð biðið næmingarnar um at fyrihalda seg til nakrar positivt orðaðar útsagnir um yvirskipaðar partar, sum eru tengdir at skúlafelagsskapinum. Upplivilsið at hoyra til í skúlanum, dáma væl tímarnar, lærararnar og fríkorterini. *At uppliva at hoyra til* í skúlanum er eitt kjarnufyribrigdi, sum er avgerandi fyri tryggleikan og trivnaðin hjá einstaka nævminginum og harumframt eisini javnvágin í felagskapinum (Hansen og Kofoed 2020). 43% av næmingunum eru sera samdir í, at teir

føla seg hoyra til á sínum skúla, meðan 29% eru eitt sindur samdir í tí. Hetta gevur 72% tilsamans.

Tilsamans 11% av næmingunum siga seg vera sindur ella sera ósamdar í at føla seg hoyra til í skúlanum, meðan tilsamans 17% siga seg vera hvørki samd ella ósamd í tí ella ikki vita (Fylgiskjal 4, sp. 2.2). Hetta merkir, at nærum triði hvør næmingur upplivir eitt leyst ella ivasamt tilknýti til skúlan. Hvussu eitt skeiklað tilknýti til skúlan upplivist, sæst aftur í svarinum hjá næmingi upp á spurningin, hvat tað ringasta við at vera í skúla:

*"Tað ringasta við at vera í skúla er at blíva hildin uttanfyri"*.

Skúlatímarnir eru karmurin rundan um fakligu undirvísingina. Tá tað kemur til at *dáma væl tímarnar* eru tilsamans nærum helvtin (47%) samd í tí, meðan fjórði hvør næmingur (25%) er ósamdur í tí. Somuleiðis er fjórði hvør næmingur (26%) hvørki samdur ella ósamdur í at dáma væl tímarnar.

Lærarin er autoriteturin, lærumeistarin og leiðarin av undirvísingini. Tað eru 66% av næmingunum, sum eru sera samd ella sindur samd í at *mær dámar væl lærararnar*. 15% eru antin sera ósamd ella sindur ósamd í hesum, meðan 18% eru hvørki ósamd ella samd í tí útsøgnini.

Fríkorterini eru karmurin, har persónligi, sosiali og fakligi trivnaðurin kemur í spæl uttan at vera stýrdur og skipaður av lærarunum. Her eru tilsamans 84% av næmingunum samdir í *at dáma fríkorterini*. Ein næmingur upplivir fríkorterini sum tað ringasta við at vera í skúla:

*"At eg ongantíð havi nakran at spæla við ella vera saman við í fríkorterinum"*

Hinvegin er tað besta við at vera í skúla eisini tætt knýtt at kensluni av felagsskapi og at hoyra til. Ein næmingur sigur tað besta við skúlanum vera, "*at eg havi ein góðan flokk og onkran at spæla við"*.

Ein annar næmingur sigur soleiðis:

*"Tað besta [við at vera í skúla] er at hava góðar vinir og góðar lærarar. Og at læra okkurt nýtt hvønn tann einasta dag."*

## 4. Næmingurin, floksmentanin og undirvísingin

Fyri at fáa innlit í, hvussu flokkurin virkar og upplivist, hava vit sett fram átta ymisk páhald. Umframt happing, sum vit hava viðgjørt í kap. 1, snúgva tey seg um samstarv, samskifti, ymiskleika, samanhald og tryggleika. Seks av hesum páhaldunum vóru eisini í kanningini í 2019, meðan tvey av teimum eru nýggj. Í øllum hesum seks viðurskiftunum er støðan munandi versnað síðani 2019 burtur sæð frá einum, og tað er ymiskleika.

Tilsamans 85% siga, at tað altíð og sum oftast er *ok, at vit eru ymisk í flokkinum* (Talva 7). Her er ein sera stór framgongd hend, við tað, at nú halda 85% av næmingunum, at hetta er soleiðis altíð ella sum oftast. Hetta talið var 62% í 2019.

Talva 7: Fatanin av at vera ymisk

| | | Ja, altíð | Ja, sum oftast | Viðhvørt | Sjáldan | Ongantíð | Nei | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Er tað ókey, at vit eru ymisk | 2023 | 66% | 19% | 7% | 3% | 1% | 2% | 3% |
| | 2019 | 34% | 28% | 23% | 4% | 1% | 2% | 9% |

Tá hesi tølini verða greinað nærri sæst, at genturnar hava helst lyndi at vera eitt sindur meira varnar við at siga, at tað er meginreglan, men tað eru dreingirnir, sum í størri mun eru avgjørdir. 4% siga, at tað er ongantíð OK og 4% siga seg ikki vita. Tilsvarandi tølini fyri genturnar er 2%.

Verður hugt eftir floksstigi, so er tað serliga í 5. flokki, at næmingarnir halda, at í teirra flokki er tað ókey, at tey eru ymisk. Har siga 91% hetta vera støðuna altíð ella sum oftast. Í 7. og 9. flokki er hetta talið 81%.



# 88%

siga, at tað altíð ella sum oftast er OK, at vit eru ymisk

Tey, sum ikki eru vorðin happað í skúlanum, eru munandi meira sannførd um, at tað er OK, at vit eru ymisk. Har 88% siga, at tað er OK altíð ella sum oftast, meðan av teimum, sum verða happað, antin tað er viðhvørt ella ofta, siga bert 74%, at tað er OK at vera ymisk í teirra flokki. Sama mynstur sæst við trivnaðinum, 88% av teimum, sum trívast væl, halda, at tað er altíð ella sum oftast OK í teirra flokki at vera ymiskur, meðan av teimum, sum trívast hvørki væl ella illa, halda bert 79%, at flokkurin er so tolsamur. Av teimum, sum trívast illa ella sera illa, halda bert 61%, at tað er OK at vera ymiskur, 17%, at tað er bert viðhvørt ella sjáldan og 13%, at tað er ongantíð OK. Tey írestandi 10% vita ikki.

At *gera nógv fyri, at øll skulu føla seg væl* í flokkinum er nógv versnað, tí í ár eru tað 20 prosentstig færri enn í 2019, sum tilsamans siga ja, altíð og sum oftast til hetta. Í 2019 var hetta samlaða talið 66%, meðan tað í ár er 46%. Tey, sum svara sjáldan, nei ella ongantíð til hetta í ár eru 24% og sostatt í stórari øking í mun til tey 11% í 2019. Tey, sum ikki vita her, eru umleið 7% bæði árini og tey, sum siga, at tað er viðhvørt, at tey gera nógv fyri, at øll skulu føla seg væl, eru 23% í ár og 17% í 2019.

Páhaldið um, at *vit tosa um, hvussu vit skulu vera saman* varð framsett fyri fyrstu ferð í ár. Svarini til tað býta seg nøkulunda javnt út á ja, altíð og sum oftast (31%), viðhvørt (27%) og sjáldan, ongantíð og nei (35%). Til hetta páhaldið svaraðu 7% seg ikki vita.




Stór minking er í semjuni um, at *vit tosa væl saman* í okkara flokki. 20% færri í 2023 (59%) enn í 2019 (79%) siga ja, altíð og ja, sum oftast til tað. Tilsvarandi er støðan versnað í svarunum sjáldan, ongantíð og nei til páhaldið um at tosa væl saman í flokkinum, har tey vóru 6% í 2019 og 16% í 2023. Tað eru tó 9% fleiri í ár, nærum fjórði hvør (22%), sum sigur seg vera samdan í, at tað viðhvørt er soleiðis, at tey tosa væl saman.

Seinna páhaldið um flokkin, sum varð framsett fyrstu ferð í ár, var hetta, at *tað ber til at vera ósamd/ur í okkara flokki*. Her siga 62% tilsamans, at so er altíð og sum oftast. 21% siga, at tað er so viðhvørt, meðan 9% tilsamans siga tað sjáldan, ongantíð og ikki vera so. 9% vita ikki. Sostatt kann sigast sum heild, at næmingar uppliva tað vera nokkso ok bæði at vera ymisk og at vera ósamd.

Afturgongdin í viðurskiftunum í mentanini í flokkinum sæst eisini aftur í minkingini í *góðum samanhaldi í flokkinum.* 56% boða frá í ár, at samanhaldið er gott mótvegis 69% í 2019. Sostatt ein minking uppá nærum 14 prosentstig. Í ár eru tað tó 10% fleiri (22%) enn í 2019, sum svara, at gott samanhald er viðhvørt, meðan tað sjáldan, ongantíð ella ikki er so hjá 13% í ár mótvegis 6% í hesum svarbólkinum í 2019. Talið av teimum, sum ikki vita, um samanhaldið er gott liggur um 10% bæði árini.



56%

siga, at tað er gott samanhald í flokkinum.
Ein minking á 14% síðani 2019

Sum tað síðsta páhaldið um flokkin, varð hetta framsett í kanningini í 2023: *er trygt at vera.* Vitandi, at tryggleiki er ein grundleggjandi tørvur fyri at trívast og læra, mettu vit hesa orðingina vera neyvari enn orðingina í 2019, sum var Í okkara flokki er gott at vera. Hóast lýsingarorðið er broytt, eru bæði núverandi lýsingarorðið "trygt" og táverandi "gott" positivt lødd og tískil meta vit, at svarini kunnu vera sambærilig um eina ábending um grundleggjandi heildarupplivilsið hjá næminginum at vera í flokkinum.

Í 2023 siga 75% tilsamans, at tað er trygt (altíð og sum oftast) at vera í flokkinum. Í sama svarbólki í 2019 vóru 82%. Also ein minking á 7 prosentstig. Svarini býta seg annars nøkunlunda javnt á hinar svarmøguleikarnar, burtursæð frá "veit ikki", har 7% í ár seta sítt svar, meðan bara 2% settu sítt svar har í 2019.

## Um undirvísingina

Í kanningini í ár hava vit sum nakað nýtt lagt okkum eftir eisini at fáa innlit í, hvussu næmingarnir uppliva didaktisku viðurskiftini í flokkinum. Átta spurningar (t.e. páhald, sum næmingarnir kunnu vátta ella avsanna við gradueringum, fylgiskjal 4, sp. 4.1) eru settir hesum viðvíkjandi. Harav eru tveir spurningar frá kanningini í 2019, meðan hinir seks eru nýggir og harvið hava vit onki til samanberingar teimum viðvíkjandi.

Hesir báðir spurningarnir um undirvísingina, sum ganga aftur í kanningini í ár og í 2019 eru um, hvussu næmingurin upplivir tímarnar og hvørt næmingurin upplivir arbeiðsfrið. Her skal tilskilast, at í orðingini í ár brúktu vit lýsingarorðið "spennandi" um tímarnar, meðan vit brúktu lýsingarorðið "góðir" í 2019. Páhaldið í spurnablaðnum í ár var soleiðis soljóðandi: *Í okkara flokki eru tímarnir spennandi.* Skiftið í lýsingarorðinum frá "góðir" til "spennandi" kann møguliga gera ein ávísan mun fyri næmingarnar og harvið

svarúrslitið. Tó eru bæði hasi lýsingarorðini í páhaldinum positivt lýsandi um tímarnar. Tað vísir seg, at positiva afturmeldingin um tímarnar er í munandi lækking.

Í 2019 søgdu 58% av næmingunum, at tímarnir vóru góðir, altíð ella sum oftast. Í ár, í 2023, siga bara 15% av næmingunum, at tímarnir eru *spennandi* altíð ella sum oftast. 39% siga tímarnar vera spennandi í noktandi mun (sjáldan, ongantíð og nei), mótvegis bara 12% í 2019. Talið um, at tímarnir viðhvørt eru spennandi, er tó munandi hægri í ár (45%) enn teir góðu tímarnir í 2019 (29%). Tað eru fá, sum ikki vita, um tímarnir eru góðir, nevniliga 1% bæði árini.

Viðvíkjandi páhaldinum um *arbeiðsfrið* er hampuliga stór minking í semjuni um tað millum næmingarnar í kanningini 2019 og 2023. Í 2019 søgdu 33% seg vera samd í, at arbeiðsfriður er í flokkinum, meðan talið í 2023 er minkað niður í 25% í 2023.

Samanhildið við ábendingina um yvirhøvur ringa trivnaðin í kanningini og stóru lækkingina i upplivilsinum av, at tímarnir eru spennandi, kann tað vera relevant at vísa á fyribrigdið keðsemi, sum filosoffurin Heidegger lýsir tað sambært (Hyldgaard, 2020). Keðsemi er ein vernd móti angist og meiningsloysi. Tað er ein ótilvitað, ikki-viljastýrd kensla, sum inniber, at tíðin og tíðarkenslan verða nærverandi og tað eru serliga tey viðurskiftini, sum geva óhugan/stiknið, óbehagið. Hetta stiknið kann fjarða út, tá meining aftur kemur í, antin uttanífrá, møguliga gjøgnum undirvísingina ella innaní frá næminginum sjálvum. Í besta føri kann kreativitetur koma burturúr, men tað slepst ikki undan, at ikki-spennandi tímar hvørki eru hugaligir ella kveikjandi fyri einstaka næmingin ella felagsskapin. Ei heldur fyri læraran, hugsandi.

Tá vit harumframt vita, at upplivaða happingin í flokkinum er høg (11% í 2023 og 5% í 2019), er angist í skapi av sosialum ótta fyri útihýsing væntandi ein fylgisveinur, sum ger seg galdandi í undirvísingini og ávirkar hana í negativan mun. Grundkreftirnar í happing eru jú tørvurin at hoyra til, sum ikki verður nøktaður ella svaraður og tískil munnar út í sosialum ótta fyri at verða útihýstur. Hetta krevur orku av næmingunum fyri at halda seg til. Eisini sæst hetta aftur í lágu fráboðanini um at fáa hugsavnað seg í tímunum (38%). Negativar kenslur sum angist, stikni og ótti, gera tað torført at mentalisera, sum er fortreytin fyri at virka væl saman við sær sjálvum og øðrum og vera aktivt lærandi (Fonagy 2019; Hagelquist 2022; Brandtzæg v.fl.. 2017).




Tímarnir eru annars soleiðis, at tað í mestan mun er *lærarin, sum tosar, og næmingarnir lurta*. Hetta siga 59% av næmingunum. Triði hvør næmingur (30%) sigur tað vera soleiðis viðhvørt, meðan knapt tíggjundi (9%) hvør næmingur sigur hetta sjáldan, ongantíð ella ikki vera. Hetta er í tráð við kanningar hjá John Hattie, sum vísa, at lærararnir tosa í 89 prosentum av tíðini (Løw, 2018).

Næmingarnir eru í stóran mun samdir um, at *teir kunnu spyrja læraran, tá teir ikki duga okkurt*. Hetta svara heili 91%, meðan tað bara eru 5%, sum meta hetta vera viðhvørt og bara 2%, sum sjáldan, ongantíð ella ikki uppliva tað. Lærarin upplivist sostatt í stóran mun at vera til taks hjá næmingunum í fakligum høpi. Hetta sama upplivist ikki í líka stóran mun, tá tað kemur til at *kunna tosa við læraran, tá tey hava brúk fyri tí*. Tó, samlað sæð í stóran mun, tí 71% meta tað vera so altíð og sum oftast. Síðani metir tíggjundi hvør næmingur, at tað er so viðhvørt (10%), somuleiðis nærum tíggjundi hvør (9%), at tað ongantíð, sjáldan ella ikki er so og tey síðstu tíggindu (11%) vita ikki, um tað er so, at tey kunna tosa við læraran, tá tey hava brúk fyri tí. Samanumtikið kann sigast, at lærarin upplivist fakliga at vera til taks og í minni mun vera til taks sosialt.

Serliga flokslærarin hevur fyri summar næmingar stóran týdning. Ein næmingur sigur soleiðis: *"Mín flokslærari, hann er fittur og tímir faktiskt at tosa, vissi okkurt er; tað hjálpir nógv í mun til hinar."* Ein annar sigur soleiðis um flokslæraran:

> *"Fyrr høvdu vit [navn á flokslærara], og hon spurdi altíð allan flokkin um, hvussu fríkorterini vóru, og vit brúktu ofta floksins tíma uppá at vera saman og tosa um trivnað. Tað gera vit ikki longur og eg haldi, at man burdi gjørt okkurt við tað."*

*Lærararnir* upplivast annars sum í stóran mun *havandi væntanir til næmingarnar,* tí 79% tilsamans eru samd um, at tað altíð og sum oftast er so, at lærararnir vænta, at tey gera sítt besta. 5% siga, at tað er so viðhvørt, 3%, at tað er so í lítlan mun, meðan 12% vita ikki. *Arbeiðsfriður*in er í minking, tí bara fjórði hvør næmingur (25%) metir arbeiðsfrið at vera í undirvísingini mótvegis góðum triðingi (33%), sum metti tað í 2019. Talið av teimum, sum meta arbeiðsfrið vera viðhvørt, er tað sama (38% í ár og 38% í 2019), meðan tað er meira enn triði hvør næmingur (35%), sum metir arbeiðsfrið sjáldan, ongantíð ella ikki at vera.

Páhaldini, hvørt *tað er lætt at hoyra, hvat lærarin sigur í tímunum* og *hvat hinir næmingarnir siga í tímunum* upplivast verandi nøkunlunda eins. Umleið 65% (68% og 63%) av næmingunum uppliva tað so at vera. Fimti hvør næmingur (19%) upplivir tað viðhvørt at vera lætt at hoyra, hvat lærarin sigur, meðan eitt sindur fleiri, nærum fjórði hvør næmingur (24%) upplivir tað vera lætt at hoyra, hvat hinir næmingarnir siga. Tíggjundi hvør næmingur metir tað sjáldan, ongantíð og ikki vera lætt at hoyra, hvat lærarin sigur (11%) og hvat hinir næmingarnir siga (10%).

### Undirvísingarfakini í mun til trivnað

Fólkaskúlalógin orðar sera góðar ásetingar um endamál fólkaskúlans, har einstaki næmingurin skal nema sær kunnleika, mennast persónliga við at menna síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og næmingurin skal búgvast til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Hetta eru viðurskifti, sum eru í góðum samsvari við lýsingina hjá Ryan og Deci (2017).

Fyrst av hesum nevndu er kunnleiki og ein av spurningunum, sum henda trivnaðarkanningin hevur sett, er "hvussu dugir tú í skúlanum?". Tá greinað verður eftir at spurningarnir eru bólkaðir soleiðis at "sera væl" og "væl" eru saman, verður kynsmunurin útjavnaður – tað samsvarar eisini væl við okkara royndir frá øðrum spurnakanningum, sum vit áður hava gjørt, at dreingir hava lyndi at svara meira avgjørt enn gentur. Tað er heldur eingin týðandi hagfrøðiligur munur á svarunum fyri, hvørjum flokki tey ganga í, tó at tað sæst, at næmingar í 5. flokki halda seg duga eitt vet betri enn tey 9. flokki. Knýtt at, hvussu næmingar halda seg duga i skúlanum, er kenslan av at tað gongur væl í skúlanum, at teimum dámar at læra og at tað er stuttligt at ganga í skúla. Harumframt hevur samanhaldið í flokkinum týdning, at øll í flokkinum kenna seg væl og síggja týdningin í at tosa um, hvussu

tey eru saman og at tað er ókey at vera ymisk. Ikki óvæntað halda tey, sum meta seg duga illa í skúlanum eisini at uppgávurnar í skúlanum eru torførar, eins og tey eisini eru tey sum hava torførast við at hugsavna seg. Har er eisini eitt samband við, at tey í eitt sindur størri mun enn hini svara játtandi til, at tey halda seg burtur frá onkrum tímum, tí tey ikki orka at vera har. Hugburðurin til lærugreinarnar er eisini øðrvísi hjá teimum sum meta seg duga væl í skúlanum.

### Hugburður til skúlagongd og úrtøku

Fyri 10 árum síðani fingu allir næmingarnir í 8. og 9. flokki í føroyska fólkaskúlanum í einum spurnablaði nakrar útsagnir at taka støðu til, sum snúðu seg um teirra hugburð til skúlagongd og læring. Í fyriliggjandi trivnaðarkanning vórðu hesar somu útsagnir aftur settar. Í svarunum hjá teimum, sum eru samd í útsagnunum, benda tølini á, at tað eru fleiri sum halda tað vera stuttligt at ganga í skúla nú enn fyri 10 árum síðani. Eisini halda tey, at tað gongur rímiliga væl í skúlanum, men hugburðurin til læring er ikki líka góður sum fyri 10 árum síðani og tað eru ikki meira enn 55%, sum dámar at læra (Mynd 5).




*Mynd 5: Útsagnir um hugburð til skúlagongd og læring*

Spurningarnir eru eisini brúktir í Íslandi og í 2013 var tað so, at íslendskum næmingum dámdu betur at ganga í skúla enn føroyskum (51% í Íslandi og 39% í Føroyum vóru samd um, at tað var stuttligt at ganga í skúla). Vit sóu eisini tá, at ofta høvdu næmingarnir í yngru flokkunum (6.-8. flokkur í Íslandi, og 8. flokkur í Føroyum) lyndi at halda skúlan vera eitt

sindur stuttligari enn næmingarnir í 9. flokki. Hetta mynstrið síggja vit aftur í hesi nýggju kanningini og framgongdin í fatanini av, at tað er stuttligt at ganga í skúla, er helst mest tí, at yngru flokkarnir eru slopnir framat at svara. Støðan í skúlanum í dag er, at ið hvussu er helvtin av næmingunum og munandi meira í hádeild, halda ikki, at tað er stuttligt at ganga í skúla.

Hugburðurin til at dáma at fara í skúla er eisini eitt mát fyri trivnað og av teimum 827 svargevunum, sum eru samdir í, at tað er stuttligt at ganga í skúla, siga 724, ella 88%, seg trívast antin sera væl ella væl í skúlanum. Í 2013 vóru genturnar meira hugaðar fyri at ganga í skúla enn dreingirnir – hetta er lutvíst eisini so í dag, men munurin er minkaður (Talva 8).

Talva 8: Títtleikin av teimum, ið halda tað vera stuttligt at ganga í skúla - býtt á floksstig og kyn

| | | 5. flokkur | 7. flokkur | 8. flokkur | 9. flokkur | Allar/allir |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gentur | 2013 | | | 45% | 44% | 44% |
| | 2023 | 63% | 52% | | 41% | 52% |
| Dreingir | 2013 | | | 38% | 31% | 34% |
| | 2023 | 54% | 45% | | 38% | 46% |

Sama mynstur sæst í fatanini hjá næmingunum um, hvørt tað gongur væl í skúlanum. Hóast prosenttalið fyri føroysku svarini er tað sama sum fyri 10 árum síðani, so er hetta, tí tey í yngru flokkunum í størri mun enn tey í eldru flokkunum halda, at tað gongur væl í skúlanum. Hetta er neyvt sama mynstur, sum vit sóu í Íslandi fyri 10 árum síðani.

Harafturat er tann broytingin farin fram, at dreingirnir halda í størri mun enn fyrr, at tað gongur væl í skúlanum, meðan genturnar sum heild ikki eru líka sannførdar um hetta longur (Talva 9).

Talva 9: Títtleikin av teimum, ið halda tað ganga væl í skúlanum - býtt á floksstig og kyn

| | | 5. flokkur | 7. flokkur | 8. flokkur | 9. flokkur | Allar/allir |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gentur | 2013 | | | 72% | 71% | 71% |
| | 2023 | 73% | 66% | | 62% | 67% |
| Dreingir | 2013 | | | 75% | 65% | 70% |
| | 2023 | 76% | 78% | | 68% | 75% |

*Genturnar eru ikki líka hugagóðar at læra longur*. Í 2013 lógu genturnar í 9. flokki 12 prosentstig omanfyri dreingirnar í teirra hugi at læra, men nú í 2023 sæst, at genturnar í 9. flokki hava um nakað minni hug at læra enn dreingirnir, meðan tær framvegis liggja eitt sindur hægri í 5. og 7. flokki (Talva 10).

Talva 10: Títtleikin av teimum, ið dámar væl at læra - býtt á floksstig og kyn

| | | 5. flokkur | 7. flokkur | 8. flokkur | 9. flokkur | Allar/allir |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gentur | 2013 | | | 61% | 69% | 65% |
| | 2023 | 66% | 55% | | 55% | 59% |
| Dreingir | 2013 | | | 60% | 57% | 59% |
| | 2023 | 52% | 49% | | 57% | 52% |

Staðfestast kann, at hugburðurin til skúlagongd og læring er viknaður seinastu 10 árini, og tann størri áhugin fyri skúlagongd og læring, sum genturnar hava havt, tykist at vera fánaður burtur, serliga í 9. flokki.

## Lærugreinarnar minni týdning og eisini keðiligari

Í 2012/13 vórðu næmingar í 8. og 9. flokki spurdir um teirra hugburð til lærugreinarnar. Tá vísti tað seg, at svarini bendu á, at tað er eitt samband millum, hvussu týdningarmikla næmingarnir halda eina lærugrein vera og hvussu stuttliga, teir halda hana vera. Tað, sum eisini vísti seg var, at tær kreativu og verkligu lærugreinirnar høvdu lættari við at lyfta seg upp á stuttleikaásinum, hóast tær ikki vórðu mettar at verða serliga týdningarmiklar (Mynd 6).




*Mynd 6: Dátur frá 2013, við úrslitunum frá 8. og 9. floks næmingum saman, sum vísir teirra hugburð til, hvussu ávikavist týdningarmiklar og stuttligar lærugreinarnar eru.*

Í hesi nýggju trivnaðarkanningini hava vit endurtikið spurningarnar, og hóast úrslitini ikki kunnu beinleiðis samanberast, tí floksstigini ikki eru heilt tey somu, so er ein broyting hend við hugburðinum til skúlafakini. Í flestu førum soleiðis, at virðingin fyri teimum er minkað, og tey eru vorðin minni stuttlig. Munurin millum tær bókligu og tær kreativu og verkligu lærugreinarnar er javnaður nakað nú, tó soleiðis, at serliga í 5. flokki er framvegis eitt ávíst uppbýti og vit síggja eisini, at næmingarnir í 5. flokki virðismeta tey kreativu og verkligu fakini (Mynd 7).




*Mynd 7: Hugburðurin hjá 5. floksnæmingum í hesi kanningini til, hvussu týdningarmiklar og hvussu stuttligar lærugreinarnar í skúlanum eru. Prosenttalið av teimum, sum eru antin samd ella sera samd, at lærugreinarnar eru ávikavist týdningarmiklar (x-ásin) ella stuttligar (y-ásin).*

Tað tykist tó sum um lærugreinarnar hava flutt seg omaneftir á ásinum og verða tískil mettar ikki líka týdningarmiklar longur. Ensktlærugreinin, sum fyri 10 árum síðan varð mett at vera týdningarmiklasta lærugreinin, tykist ikki at vera vird líka nógv nú (Talva 11), tó at hon tekur seg nakað fram í 9. flokki (mynd 8). Dansktlærugreinin liggur nøkulunda í sama stað, men týskt verður ikki mett sum ein lærugrein av stórum týdningi longur. Í talvu 11 eru bert tølini fyri 9. flokk víst fyri at kunna samanbera árini 2012/13 við 2022/23.

Talva 11: Meting av lærugreinunum í 2013 og 2023

| | 2023 | | 2013 | |
|---|---|---|---|---|
| | Samd týdning | Samd stuttligt | Samd týdning | Samd stuttligt |
| Støddfrøði | 79% | 40% | 93% | 47% |
| Føroyskt | 78% | 27% | 85% | 35% |
| Alis- og evnafrøði | 47% | 38% | 71% | 37% |
| Lívfrøði | 50% | 33% | 74% | 40% |
| Landafrøði | 37% | 29% | 68% | 31% |
| Danskt | 56% | 18% | 62% | 28% |
| Enskt | 73% | 40% | 96% | 55% |
| Týskt | 7% | 12% | 45% | 20% |
| Søga og samtíð | 42% | 28% | 61% | 34% |
| Kristni | 31% | 16% | 45% | 28% |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sangur og tónleikur | 7% | 18% | 24% | 58% |
| Myndlist | 8% | 18% | 18% | 46% |
| Handarbeiði/smíð | 9% | 23% | 18% | 49% |
| Heimkunnleiki | 27% | 45% | 37% | 65% |
| Ítróttur | 53% | 64% | 49% | 70% |

Tað, sum vit eisini síggja, er at í fleiri førum halda næmingarnir lærugreinarnar hava minni og minni týdning, samstundis sum lærugreinarnar eisini verða mettar at vera minni stuttligar, so hvørt sum næmingarnir koma í eldru flokkarnar (mynd 8).




*Mynd 8: % samd ella sera samd at fakið er stuttligt/ týdningarmikið, 7. og 8. flokkur. Hugburðurin hjá næmingunum í 7. flokki (bláir puntar) og í 9. flokki (reyðir puntar) til, hvussu ávikavist týdningarmiklar og stuttligar lærugreinarnar eru. Í fleiri førum er lítil og eingin munur á flokkunum, t.d. støddfrøði, føroyskt, danskt og samfelagsfrøði, meðan tað er rættiliga stórur munur á teimum lærugreinum í miðdeild, sum tey ikki hava í hádeild. Tað sæst, at tey í 7. flokki hava ein meira positivan hugburð til hesar lærugreinarnar, sum er farin, tá tey koma í 9. flokk.*

Hetta eru rættiliga ørkymlandi tøl og tey kunnu tulkast á ymsar hættir. Næmingarnir halda framvegis ikki, at tað er stuttligt at ganga í skúla (Talva 8), og hugurin at læra er eisini fallin nakað (Talva 9), samstundis sum vit kunnu staðfesta, at bert sætti hvør næmingur heldur tímarnar vera spennandi. Vit vita, at lærarar í ávísan mun undirvísa í øðrum enn sínum linjufakum og hetta kann sjálvandi hava ávirkan á, hvussu áhugaverda teir megna at gera

undirvísingina. Ein onnur tulking kann eisini vera, at næmingarnir eru komnir longur enn skúlarnir í at flyta seg frá pensumsstýrdari undirvísing til tvørfakligar læruúrtøkur og førleikar at gagnnýta vitan í nýggjum samanhangum og um skúlarnir ikki geva næmingunum hóskandi avbjóðingar samsvarandi tíðarandanum, so hava næmingarnir ilt við at síggja, hvat ætlanin er, at tey skulu fáa burturúr undirvísingini. Rasch-Christensen og Rasmussen (2020) vísa á, at arbeiðið við námsætlanum má taka hædd fyri bæði fíggjarligum og sosialum broytingum og samstundis sum tær skulu taka hædd fyri vitan, sum næmingurin má tilogna sær, so er tað nú líka so týdningarmikið, at næmingarnir megna at gagnnýta ta tilognaðu vitanina.




*Mynd 9: Mynd, sum vísir munin í hugburðinum til, hvussu ávikavist týdningarmiklar og stuttligar næmingarnir meta lærugreinarnar í skúlanum. Bert dátur frá 9. flokki eru við í hesi greiningini. Legg til merkis, at flestu tølini eru negativ og harvið vísa afturgongd. Bert ítróttur verður mett at vera týdningarmiklari lærugrein enn fyri 10 árum síðani og bert alis- og evnafrøði verður mett at vera eitt vet stuttligari enn fyri 10 árum síðani. Týskt er tann lærugreinin við størstu afturgongdini í hugburði til týdning og sangur og tónleikur er tann lærugreinin, sum hevur størst afturgongd í mun til, hvussu stuttliga næmingarnir fata lærugreinina. Sí eisini talvu 11.*

Í kanningini 2023 hava næmingarnir í fleiri førum havt møguleika at skriva meira frítt teirra hugsan, m.a. um, hvat tað besta við at ganga í skúla er og tað ringasta. Tað er rættiliga eyðsýnt, at skúlafakini, og tá serliga tær bókligu lærugreinarnar, eru rættiliga fráverandi í hugaheiminum hjá næmingunum. Tað besta við skúlagongdini er at vera saman við vinum, men næmingarnir vísa eisini á, at teimum dámar at læra. Tó í flestu førum siga tey ikki, hvat fyri læring, tey hava áhuga í. Fríkorterini eru eisini høgt í metum, har nógv eisini nevna møguleikan fyri at røra seg. Tann lærugreinin, sum verður oftast nevnd sum partur av tí besta við at ganga í skúla, er ítróttur.

### Floksstøddin hevur ávirkan á arbeiðsfrið

Í nýggjastu kanningini hava vit sett spurningin um næmingatal í flokkinum, og her sæst, eins og í "Næmingahagtøl" hjá Undirvísingarstýrinum (2023) at flokkarnir við stóra næminga-talinum í stóran mun hoyra til teir stóru skúlarnar. Onkur av teimum stóru skúlunum hevur eisini dupultflokkar, millum annað skúlin við Løgmannabreyt, (LMB).

Talva 12: Næmingatal sambært næmingunum (Sp. 1.4)

| | Miðal fyri smáar skúlar | Miðal fyri miðalstórar skúlar | Miðal fyri stórar skúlar uttan LMB | Miðal fyri stórar skúlar íroknað LMB | Miðal fyri allar skúlar |
|---|---|---|---|---|---|
| 5. flokkur | 7 | 19 | 23 | 27 | 22 |
| 7. flokkur | 10 | 18 | 23 | 26 | 21 |
| 9. flokkur | 13 | 21 | 21 | 25 | 22 |

Um hugt verður eftir, hvørjir spurningar hava beinleiðis tilknýti til spurningin um næmingatal í flokkinum, so sæst, at næmingatalið hevur ávirkan á, hvussu væl næmingarnir hoyra, hvat lærarin sigur og eisini, hvat hinir næmingarnir siga.

Næmingarnir vórðu spurdir um, hvussu nógv ganga í teirra flokki. Hesi tølini eru síðani bólkað í 3 bólkar: 1-18 næmingar (582 svar), 19-24 næmingar (742 svar) og yvir 24 næmingar (359 svar). Ikki óvæntað er tað eisini so, at í flokkunum við stórum næmingatali gera næmingarnir meira vart við vantandi arbeiðsfrið (Talva 13).

Talva 13: Næmingatal og arbeiðsfriður

| | | 1-18 næmingar | 19-24 næmingar | Meira enn 24 næmingar | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Er arbeiðsfriður? | Ja, altíð ella sum oftast | 29% | 23% | 21% | 25% |
| | Viðhvørt | 40% | 37% | 35% | 37% |
| | Sjáldan, Ongantíð ella Nei | 28% | 37% | 42% | 35% |
| | Veit ikki | 4% | 3% | 3% | 3% |

Ein næmingur sigur, at tað ringasta við at vera í skúla er *"at fáa høvuðpínu, og at tað er ov nógvur larmur"*. Umframt ófríð, nevnir ein annar næmingur longdina á skúladegnum sum eina avbjóðing:

> *"Sindur for leingi í skúla. Um dagurin hevði verið einar tveir tímar styttri, hevði tað verið gott. Men annars er dagurin sum heild fínur. [...] Tað er eisini ofta ófriðarligt í tímunum"*.

Eisini tá tað snýr seg um at hoyra, hvat lærarin sigur í tímunum, er støðan frægast í teimum flokkum við færri næmingum. Her sæst tó, at munurin hvørvur, longu tá næmingatalið fer upp um 19 næmingar (Talva 14). Nakað sama mynstur er eisini, tá talan er um at hoyra, hvat hinir næmingarnir siga (Talva 15).

Talva 14: Næmingatal og at hoyra, hvat lærarin sigur í tímunum

| | | 1-18 næmingar | 19-24 næmingar | Meira enn 24 næmingar | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Er lætt at hoyra, hvat lærarin sigur í tímunum | Ja, altíð ella sum oftast | 74% | 66% | 65% | 69% |
| | Viðhvørt | 17% | 20% | 20% | 19% |
| | Sjáldan, Ongantíð ella Nei | 8% | 13% | 11% | 11% |
| | Veit ikki | 1% | 2% | 3% | 2% |

Talva 15: Hvussu nógvir næmingar ganga í tínum flokki?

| | | 1-18 næmingar | 19-24 næmingar | Meira enn 24 næmingar | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Er lætt at hoyra, hvat hinir næmingarnir siga í tímunum | Ja, altíð ella sum oftast | 70% | 61% | 58% | 63% |
| | Viðhvørt | 19% | 26% | 26% | 24% |
| | Sjáldan, Ongantíð ella Nei | 7% | 10% | 13% | 10% |
| | Veit ikki | 3% | 3% | 4% | 3% |

### Hugurin og viljin at læra

Hóast umleið 60% av næmingunum eru samdir í, at tað gongur væl í skúlanum, og 55% samdir í at teir dáma væl at læra, so eru tølini minni sannførandi tá hugt verður eftir útgreinaðu svarunum, tí einans 25% siga seg vera sera samd í at tað gongur væl í skúlanum, og bert 21% eru sera samd í at teimum dámar væl at læra, og einans 11% eru sera samd í at tað er stuttligt at ganga í skúla (Fylgiskjal 4, talva 2.2). Samstundis eru tað eisini bert 15% av næmingunum sum halda, at tímarnir altíð ella sum oftast eru spennandi, og 60% av næmingunum halda, at tímarnir altíð, ella sum oftast, eru soleiðis, at lærarin snakkar, og tey lurta – tó treyðugt so, 90% siga samstundis at tey altíð ella sum oftast kunnu spyrja lærarar, tá tey ikki duga okkurt. Samstundis síggja vit eisini, at flestu skúlafakini verða mett minni týdningarmikil enn tey vóru fyri 10 árum síðani.

Alt hetta bendir á, at næmingarnir keða seg eins og teir tykjast rættiliga líkasælir við innihaldið í skúlanum. Hetta er ikki eitt serføroyskt fyribrigdi, sum m.a. sæst í greiningunum hjá tí nú so navnframa John Hattie. Í 2008 gav hann út bókina um sjónliga læring, har hann hevði greinað fleiri enn 800 metaanalysur, sum høvdu greinað úrslitini frá fleiri enn 50.000 kanningum. Nú á vári 2023 hevur hann givið út eina uppfylgjandi greining, við meira enn 2100 metaanalysum, og við úrslitunum frá fleiri enn 130.000 kanningum. Tilmælini hjá Hattie (2023) snúgva seg um undirvísingarhættir og hvussu lærarar og næmingar hava ymiska tilgongd til tað sum hendir í skúlastovuni. Lærarar eru tilvitaðir um at teirra vinkul snýr seg um undirvísing, meðan vinkulin hjá næmingunum er um læring. Næmingarnir kunnu væl sita hugagóðir og gera ymsar uppgávur, men tað er ikki víst at teir læra nakað av

hesum (s. 92). Hinvegin er tað sambært Hattie so, at tað er neyðugt at næmingar fáa uppgávur sum krevja áhaldni, tí leiðir áhaldni tær til læring, so elur hetta motivatión til at læra meira, og næmingarnir fara í holt við hetta við enn størri treysti.

At vera nærlagdur/samvitskufullur í mun til skúlagongdina hevur nógv at siga fyri, hvat næmingarnir fáa burturúr. Nærlagdir næmingarnir tykjast vera meira motiveraðir at fáa góða úrtøku og eru vanliga betri skipaðir, meira ídnir, hugagóðir, og áhugaðir í at fáa nakað burturúr, og tí mælir Hattie (2023) at lærarar leggja seg eftir at stimbra nærlagni við at gagnnýta eginleikar so sum áhaldni, skipan, ómakur, álit og treysti.

Persónligir eginleikar hjá næmingunum at vera opin fyri at taka ímóti læru og at menna nærlagni eru nøkur av meginevnunum í uppfylgingini av Sjónligari læring, og víst verður á, at serliga tíðliga í ungdómsárunum ber til at menna sjálvsfatanina av at vera ein góður næmingur, samstundis sum tað eisini ofta er í hesum árum at avgerðin at lesa víðari verður tikin (Hattie, 2023). Her er vert at nevna, at 11% av føroysku næmingunum svaraðu, at teir duga “sera væl” í skúlanum, meðan 50% svaraðu teir teir duga “væl”.

Lærarin má leggja undirvísingina til rættis eftir áhugamálunum hjá næmingunum, og tað vil eisini siga, at lærarin má kenna næmingin. Meting av hvørt næmingurin ger framstig skal fremjast ofta og títt, og næmingurin skal hava konstruktiva afturmelding sum ger hann føran fyri at gera enn fleiri framstig. Harumframt skal næmingurin hava høvi bæði at tilogna sær yvirskipaða vitan, men eisini hava høvi at fara í dýptina í ávísum evnum – ongantíð betri um hvørji dýptarevni er nakað sum næmingurin sjálvur fær lagt til rættis eftir egnum áhuga (innan lærugreinina).

Hattie (2023) umrøður eisini, hvussu tað ber til at tað ikki er størri munur á lærarum við linjufaki, ella sergrein í ávísu lærugreinini og úrtøkuni hjá næmingunum, og niðurstøðan er, at orsøkin er tí tað fer fram ov nógv “yvirflatu” undirvísing, har næmingarnir bert læra heilt yvirskipað um evnini, men ikki fara í dýptina. Hetta er eisini ein avleiðing av, at meira og meira verður fylt inn í námsætlanir og undirvísingarætlanir, samstundis sum einki fer út.

## 5. Trivnaðurin hjá einstaka barninum

Meginparturin av teimum, ið svara, at tey verða happað í skúlanum, svara, at tey verða happað av næmingum í egnum ella øðrum flokkum. Hetta merkir, at tey verða happað av øðrum børnum, sum tey dagliga eru í tøttum sambandi við, meðan 13% svara, at tey viðhvørt ella ofta verða happað aðrastaðni enn í skúlanum. Tá tey verða spurd, um tey hava verið við til at happa onnur, svara 8%, at tey viðhvørt ella ofta hava verið við til at happa onnur í skúlanum. Eins og fyri tey, ið verða happað, er mest vanliga svarið, at tey, ið hava verið við til at happa, happa næmingar í egnum flokki ella øðrum flokkum.




Sambært tølunum er eingin ivi í, at happing hevur avleiðingar fyri tey, ið verða happað, m.a. tá hugt verður eftir yvirskipaðum trivnaði, metan av egnum evnum, kropsligum eyðkennum og lyndi til at halda seg burtur frá tímum.

Talva 16 vísir greitt, at næmingar, sum verða happaðir, trívast munandi verri í skúlanum. Tey meta síni egnu evni nógv lægri enn næmingar, ið ikki verða happaðir, og tey hava oftari búkilsku og høvuðpínu í skúlanum. Harafturat halda tey seg í størri mun burtur frá tímum, tí tey ikki orka at vera har. Í talvuni niðanfyri sæst trivnaður, metan av egnum evnum, kropslig eyðkenni, at halda seg burtur frá tímum og vinarløg hjá næmingum, sum verða happaðir og næmingum, sum ikki verða happaðir.

Talva 16: Trivnaður hjá næmingum, ið verða/ikki verða happaðir

| | Næmingar, sum verða happaðir (%) | Næmingar, sum ikki verða happaðir (%) |
|---|---|---|
| Eg trívist væl ella sera væl í skúlanum | 45% | 79% |
| Eg dugi væl ella sera væl í skúlanum | 50% | 63% |
| Eg havi ofta ella sera ofta ilt í búkinum, tá eg eri í skúla | 24% | 13% |
| Eg havi ofta ella sera ofta ilt í høvdinum, tá eg eri í skúla | 31% | 21% |
| Viðhvørt ella ofta haldi eg meg burtur frá tímum, tí eg orki ikki at vera har | 43% | 29% |
| Eg havi ongan vin í flokkinum | 4% | 2% |
| Eg havi ein ella fleiri vinir á netinum | 75% | 72% |

Talva 17 vísir eisini, at umleið tvífalt so nógvir næmingar, ið verða happaðir, siga seg ongan vin hava í flokkinum, samanborið við næmingar, ið ikki verða happaðir. Hetta er í tráð við allýsingina av happing, ið verður fatað sum gerðir, ið halda einum ella fleiri næmingum uttan fyri felagsskapin (DCUM, 2021). Happingin ávirkar tilknýtið hjá tí einstaka til felagsskapin í flokkinum, umframt at ávirka felagsskapin í sjálvum sær. Tølini benda eisini á, at næmingar, ið verða happaðir, í størri mun hava vinir á netinum enn næmingar, ið ikki verða happaðir. Tí kundi verið líkt til, at teir næmingar, ið ikki hava tilknýti til floksfelagsskapin gjøgnum vinaløg í flokkinum, hava vinaløg á netinum, sum kunnu hava jaliga ávirkan á trivnaðin hjá barninum/tí unga og sostatt virka sum ein verjandi táttur.

Flestu næmingarnir (94%) siga seg annars hava ein ella fleiri vinir í flokkinum. Ein stórur partur (84%) hava ein ella fleiri vinir í øðrum flokkum í skúlanum, meðan 69% siga seg hava ein ella fleiri vinir á netinum, sum ikki eru í skúlanum.

## At verða hildin uttanfyri og óttin fyri at verða hildin uttanfyri

Um hugt verður eftir svarunum hjá næmingunum um at verða hildin uttanfyri og um óttan fyri at verða hildin uttanfyri, svara tey flestu (78%), at tey ongantíð ella næstan ongantíð eru blivin hildin uttanfyri í skúlanum hetta skúlaárið. Næstan helvtin (46%) svarar, at tey sjáldan ella ongantíð eru bangin fyri at blíva hildin uttanfyri.





Av næmingunum svaraðu 22%, at tey verða hildin uttanfyri upp til fleiri ferðir um vikuna og 35% svaraðu, at tey viðhvørt, ofta ella sera ofta eru bangin fyri at blíva hildin uttanfyri. Her sæst stórur kynsmunur, tí av gentunum eru 14% ofta ella sera ofta bangnar fyri at verða hildnar uttanfyri, meðan tað bert eru 3% av dreingjunum, ið svara tað sama. Á sama hátt svara næstan tvífalt so nógvar gentur (16%), at tær upp til fleiri ferðir um vikuna eru hildnar uttanfyri í skúlanum hetta skúlaárið samanborið við dreingirnar (7%). At vera bangin fyri at verða hildin uttanfyri er ofta knýtt at einum grundleggjandi, menniskjaligum ótta fyri at vera einsamøll. Og kanningar aðrastaðni vísa, at kenslan av einsemi í størri mun rakar gentur enn dreingir (Rasmussen et al. 2018; Von Soest T., Gerstorf og M. 2019). Parturin av teimum næmingum, ið ofta ella sera ofta eru bangin fyri útihýsing, er øktur síðani seinastu kanning í 2019.

At halda onnur uttanfyri ella verða hildin uttanfyri verður í viðmerkingunum nevnt fleiri ferðir sum ein táttur, ið ávirkar næmingar í skúlanum. Ein næmingur sigur soleiðis um at verða hildin uttanfyri: *"Um eg geri avtalu við onkrar vinir um t.d. at skreiða ella spæla Gekk, fara tær uttan meg. Tað er altíð ein, sum bjóðar øllum uttan mær."* Ein onnur tykist vera greið yvir, at hon gerst partur av at halda eina aðra gentu uttanfyri: *"Eg veit, at onkur er blivin happaður, og allar genturnar uttan 3 vóru bjóðaðar á kafé, og eg var ein av teimum, sum fór við."* Ein genta sigur soleiðis um tað, sum onnur kanska halda er at arga, men som hon skilir sum happing, tí hon verður kedd av tí, sum tey kalla hana: "*Tey halda kanska, tað er ikki happing, men eg blívi faktiskt mega kedd, av tí at eg blívi kallað lítil."*

Samanborið við sjálva happingina, ið minkar við aldrinum, so er eingin munur á floksstigunum, tá tað snýr seg um at verða hildin uttanfyri ella óttan fyri at verða hildin uttanfyri, tvs. tað at verða hildin uttanfyri ella óttin fyri at verða hildin uttanfyri minkar ikki, tá næmingarnir gerast eldri. Hetta kann týða uppá, at hóast tað at útihýsa og verða útihýstur

úr felagsskapinum er eitt av eyðkennunum við happing, so bera næmingarnir óttan við sær, hóast tey ikki verða happað. Tað kann vera tekin um ein ótryggleika í felagsskapinum, sum ger, at næmingarnir óttast útihýsing og einsemi. Tað er umráðandi at geva sær far um óttan, sum næmingar hava fyri at verða útihýstir, tí hann kann vera ein partur av dynamikkinum, sum heldur happing við líka – tvs. at óttin fyri einsemi og tráanin eftir at hoyra til er tætt knýtt at, hvussu tryggan næmingurin kennir seg í flokkinum (Jørgensen, 2019).

## At boða frá happing

Tá talan er um at siga frá, at ein sjálvur ella ein floksfelagi er fyri happing, krevur tað dirvi og er eisini tengt at, hvussu tryggan ein kennir seg í flokkinum. Tann, ið sigur frá, setir seg sjálvan í eina sárbæra støðu, tí vandin fyri sjálvur at verða útsett fyri happing gerst størri (Jørgensen, 2019). Tó eru tað aloftast næmingarnir sjálvir, ið hava besta innlitið í dynamikkin og stigskipanina í flokkinum, og sum harvið kunnu hava ávirkan á at steðga happing, ið fer fram í flokkinum ella aðrastaðni. Ein næmingur sigur, at *"eg havi tað gott, men eg veit, at øll í skúlanum ikki hava tað gott",* so tey vita tað ofta, tá floks- ella skúlafelagar ikki trívast. Ein annar næmingur sigur, at *"skúlin tosar altíð um at stoppa at gera ljót ting ella byrja upp á okkurt gott, men tey gera faktiskt einki aftaná"*. Hesin næmingur tykist hava fatan av, at tey tosa um happing í skúlanum, men at tað ikki verður gjørt nakað ítøkiligt við tað, aftaná prátið er av. Hóast næmingurin kann hava eina vitan um happing í skúlanum, so er tað sjálvsagt ikki hennara/hansara ábyrgd at loysa trupulleikan, men tað kann hava stóran týdning, at næmingurin sigur frá.



Av teimum næmingum, ið verða happaðir, hava 27% sagt frá hesum. Sum talva 17 vísir, hava flestu teirra (56%) sagt onkrum vaksnum heima frá og kent, at tað hjálpti, meðan ein minni partur (26%) kendi tað hjálpsamt at siga flokslæraranum frá, at tey vórðu happað.

Talva 17: Títtleiki av næmingum, ið hava kent tað hjálpsamt at boða frá happing.

| Ja, eg havi sagt tað við – og tað hjálpti | Í prosentum |
|---|---|
| Onkran vaksnan heima | 56% |
| Flokslæraran | 26% |
| Onkran annan | 26% |
| Annan vaksnan á skúlanum | 13% |
| Heilsufrøðing | 10% |
| Tann ella tey, sum happaðu meg | 10% |

Títtleikin av teimum, ið kenna, at tað *ikki* hjálpti at gera vart við happingina, sæst í talvu 18. Tølini vísa sama mynstur, tvs. at flest næmingar siga onkrum vaksnum frá heima og fægst siga tí ella teimum frá, sum happa – uttan mun til um tað hjálpir ella ikki at boða frá.

Talva 18: Títtleiki av næmingum, ið ikki hava kent tað hjálpsamt at boða frá happing.

| Ja, eg havi sagt tað við – og tað hjálpti *ikki* | Í prosentum |
|---|---|
| Onkran vaksnan heima | 23% |
| Flokslæraran | 24% |
| Onkran annan | 21% |
| Annan vaksnan á skúlanum | 15% |
| Heilsufrøðing | 14% |
| Tann ella tey, sum happaðu meg | 21% |

Tá næmingarnir verða spurdir um orsøkirnar til, at tey ikki hava sagt við nakran, at tey eru vorðin happað, er fremsta orsøkin, at tey kláraðu tað sjálvi. Næstfremsta orsøkin er, at tey ikki tordu at siga tað við nakran, ið aftur kann týða á, at tað kann hava sosialar avleiðingar fyri næmingin at boða frá happing.

Sum mynd 10 niðanfyri vísir, sæst eisini, at talið á teimum, ið boða frá happing, minkar við aldrinum. Hetta hongur lutvíst saman við, at talið av næmingum, ið verða happaðir, minkar, tá floksstigini verða samanborin, men kan helst eisini skiljast sum, at hættirnir, næmingarnir handfara møguliga happing uppá, broytist við aldrinum. Ein 10-11

ára gamal næmingur er í størri mun tengdur at teimum vaksnu rundan um seg enn ein tannáringur i 9. flokki, sum yvirskipað er kensluliga og sosialt meiri búgvin til at taka egnar avgerðir.




*Mynd 10: Tal av næmingum, ið boða frá happing, 5., 7., og 9. flokkur.*

## 6. Talgildur trivnaður

Kanningin frá 2019 vísti, at tað var munur á upplivingum á netinum hjá dreingjum og gentum. Størsti munurin var, at nógv flest dreingir upplivdu ikki at sleppa upp í telduspøl og bólkar, meðan genturnar nógv oftari upplivdu, at særandi boð ella myndir vórðu sendar til ella um tær.

Tá spurt varð í 2023, um skúlabørn kendu seg happaði á talgildum miðlum, varð spurningurin endurtikin tvær ferðir. Tað merkir, at sp. 7.3 og 7.4 eru teir somu, men við hvør síni orðing. Í 7.3 var í fyrsta lagi spurt, um tey kendu seg happað og í øðrum lagi, í sp. 7.4, um tey kendu seg útihýst. Svarini vísa, at 88% svara "nei" at tey eru ikki blivin happað hetta skúlaárið. Men kortini svara 66%, at tey ikki hava upplivað at verið hildin uttanfyri, ella hava fingið sent særandi tilfar, umvegis talgildar miðlar. Her er sostatt ábending um, at tey ikki skilja ella identifisera seg sum happaði, men kunnu tó vísa á, at tey hava kent seg útihýst. Og tað er júst útihýsingin, sum er eyðkenni fyri happing. Verða tølini í sp. 7.4 greinað nærri, sæst, at talan aftur í 2023 vísir á mun millum kynini, soleiðis at gentur boða frá útihýsing á sosialum miðlum og dreingir í online spølum – sí talvu 19 niðanfyri.

Talva 19: Talgild happing hetta skúlaárið býtt á kyn (sp. 7.4).

| 7.4 Hevur tú hetta skúlaárið upplivað nakað av hesum? *(Tú kanst velja fleiri)* | 2023 | Gentur | Dreingir |
|---|---|---|---|
| At tú hevur verið hildin uttan fyri bólkum á sosialum miðlum (t.d. Snapchat) | 15% | 20% | 10% |
| At tú hevur verið hildin uttan fyri í online spølum (t.d. Fortnite) | 8% | 5% | 11% |
| At onkur hevur lagt særandi/keðiligar myndir/filmar av tær á internetið ella fartelefonina | 8% | 10% | 6% |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av tær til onnur | 10% | 5% | 9% |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av øðrum til tín | 11% | 14% | 6% |
| At onkur hevur hótt teg á internetinum ella í fartelefonini | 7% | 8% | 6% |
| Havi ikki upplivað nakað av hesum | 66% | 61% | 71% |
| Annað, hvat? | 5% | | |

Tá hugt verður at flokksstigi, sæst, at upplivingar av útihýsing økjast fyri flokksstig, við at skúlanæmingar í 9. flokki hava signifikant fleiri fráboðanir um at fáa sent særandi ella keðiligt

tilfar, og at tey í fimta uppliva mest útihýsing í online spølum – sí talvu 20 niðanfyri. Eingin signifikantur munur er millum økini í landinum.

Talva 20: Talgild happing hetta skúlaárið býtt á floksstig (sp. 7.4).

| 7.4 Hevur tú hetta skúlaárið upplivað nakað av hesum? *(Tú kanst velja fleiri)* | 2023 | 5. fl | 7. fl. | 9. fl |
|---|---|---|---|---|
| At tú hevur verið hildin uttan fyri bólkum á sosialum miðlum (t.d. Snapchat) | 15% | | ns | |
| At tú hevur verið hildin uttan fyri í online spølum (t.d. Fortnite) | 8% | 12% | 8% | 5% |
| At onkur hevur lagt særandi/keðiligar myndir/filmar av tær á internetið ella fartelefonina | 8% | 5% | 9% | 9% |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av tær til onnur | 10% | 8% | 9% | 14% |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av øðrum til tín | 11% | 6% | 11% | 17% |
| At onkur hevur hótt teg á internetinum ella í fartelefonini | 7% | 4% | 9% | 8% |
| Havi ikki upplivað nakað av hesum | 66% | ns | | |
| Annað, hvat? | 5% | | | |

Spurningur 7.6 spurdi uppaftur næmingarnar, um onnur hetta skúlaárið hava happað tey á internetinum. Til henda sæst eitt triðja tal á 77%, sum meina at onnur hava ongantíð hetta skúlaárið verið við til at happa seg á internetinum, í mun til 88% (sp.7.3) og 66% (sp. 7.4) – sí talvu 21 niðanfyri.

Talva 21: Talgild happing hetta skúlaárið – samansett svar (sp. 7.3, 7.4 og 7.6).

| | |
|---|---|
| **7.3** Ert tú hetta skúlaárið blivin happað/ur í fartelefonini ella á telduni ? (Tú kanst velja fleiri) | |
| Nei | 88% |
| **7.4** Hevur tú hetta skúlaárið upplivað nakað av hesum? *(Tú kanst velja fleiri)* | |
| At tú hevur verið hildin uttan fyri bólkum á sosialum miðlum (t.d. Snapchat) | |
| At tú hevur verið hildin uttan fyri í online spølum (t.d. Fortnite) | |
| At onkur hevur lagt særandi/keðiligar myndir/filmar av tær á internetið ella fartelefonina | |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av tær til onnur | |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av øðrum til tín | |
| At onkur hevur hótt teg á internetinum ella í fartelefonini | |
| Havi ikki upplivað nakað av hesum | 66% |
| **7.6** Hvussu ofta hava onnur hetta skúlaárið verið við til at happa teg á internetinum ? | |
| Ongantíð | 77% |

Føroyar fingu í 2017 almenn skíggjaráð at skapa góðar skíggjavanar fyri skilabest at handfara talgildu hentleikarnar, umframt at gerast tilvitað um tíð og innihald, eins og virkna og óvirknað nýtslu (Fólkaheilsuráðið 2021, s.5-6). Skíggjaráðini vóru flokkaði í fimm aldursbólkar, har hvør aldur hevði sermerkta grundgeving í mun til nýtslu og avmarking, tengt at aldrinum á barninum.

Kanningin gevur ábendingar um, at føroysku skíggjaráðini verða ikki fylgd, tá talan er um at "bíða við at geva barninum telefon við netsambandi, til tað er í minsta lagi 14 ára gamalt" (Fólkaheilsuráðið 2021, s.7). Hetta sæst við, at níggju av tíggju næmingum í 5. flokki, sum eru um 11 ára aldur, eiga telefon við netsambandi, nevnd snildfon. Helmingurin av øllum skúlanæmingunum í kanningini hava sjónvarp á kamarinum (50%) umframt aðrar snildar tøknilutir, so sum snild ur, virtual reality tól (VR) og spælistøðir.




Sambandið millum nýtslu av sosialum miðlum og vánaliga sálarligu heilsu hjá vaksnum fólki ávirkast, sohvørt sum nýtslan av sosialum miðlum økist (Tuwaym og Berry, 2018). Sosialir miðlar er eitt lætt atkomuligt amboð, sum kann virka hent – eisini í skúlahøpi. Tí er neyðugt at geva sær far um, hvørja ávirkan nýtslan hevur á privatfriðin, eins og á sosialu relatiónirnar. Tá næmingarnir vórðu spurd, um tey happa onnur  á netinum, svaraðu 6%, at tey høvdu happa onkran einaferð, 7% onkuntíð og 1,5% fleiri ferðir. 1% søgdu seg happa onnur ofta (sp. 7.5).

## Talgildur privatfriður

Privatfriður er ein av hornarsteinunum undir fólkaræðinum (Cuijpers, 2017). Við áhaldandi talgilding er tað vorðið alt meira neyðugt at tryggja fólki privatfrið í talgildum lutum. Orsøkin er, at fólk ikki hava verið vitandi um, at tá ein brúkar talgildar lutir, so taka hesir dátur og harvið kunning um brúkaran (Couldry og Hepp, 2017). Eftir avdúkingina hjá Snowden í (2019) er ivaleyst greitt fyri flestum, at hvørt klikk á internetinum verður eygleitt og skrásett. Av hesi orsøk varð í 2022 sett í gildi Dátuverndarlóg, kend sum GDPR-lógin, sum stendur fyri General Data Protection Regulation. Lógin krevur, at veitarar av talgildum tænastum skulu geva innlit í, hvørja kunning ella dátur, tey goyma um brúkaran. Henda kunning sæst á heimasíðum, sum ein áheitan um frávæl ella samtykki, við orðingini: "Henda heimasíðan brúkar farspor (*cookies*)". Við hesi kunning fær brúkarin høvi at nokta ella loyva heimasíðuveitarum at savna kunning um seg. Og við at nokta fyri nýtslu av farsporum, ella velja hvørjum ein ynskir at loyva, hevur brúkarin møguleika fyri at tryggja sín privatfrið. Men talgildir lutir taka ikki bert kunning um brúkaran.

Ein nýggjari phd-ritgerð vísir á týdningin av talgildum privatfriði, við støði í menning av sínum sjálvræði (Molitorisz, 2020). Víst verður á, at summar talgildar skipanir gera upptøkur av øllum virkseminum hjá brúkaranum, og ein vitan um henda møguleikan kann føra til ein konstantan ótta, sum kann fáa fólk at broyta atburð. Slíkt trýst á privatfriðin er trýst

á sjálvsmennandi lívsáræðið (*self-creative enterprise of living*). Tað merkir, at tá vit eru einsamøll, er okkara atferð øðrvísi, enn tá vit eru saman við øðrum. Tá vit eru saman við øðrum, gerast vit varug við, at vit verða mett um av øðrum og teirra fatanum, og vilja tí helst tillaga atburðin fyri at passa inn. Hesa tillaging gera vit eisini, um vit bert hava illgruna um, at verða eygleidd. Tí er tað avgerðandi, at børn og ung kenna seg vird, og sjálvi kunnu samtykkja, um og nær, tey ynskja at vera sjónlig ella ikki. Dømi um at goyma seg, sum sjálvverju, sæst tá fólk klistra fyri myndatólið á telduni. Henda siðvenja er komin, eftir at tað kom fram, at forrit og heimasíður kunnu sníkja sær atgongd at taka myndir og filma, uttan at eigarin av telduni ella fartelefonini hevur varhugan av tí.

Undir innsavningini í skúlunum sást, at summir næmingar, serstakliga í 7. og 9. flokki, høvdu sett ljósið á telduni munandi niður, so skíggin sýntist svartur; og tað sást ikki, at teldan var tendrað. Tá hesir næmingar bóðu um hjálp fyri at skilja onkran spurning, og biðið varð um at seta ljósstyrkina upp, varð noktað. Innsavnarin noyddist tí at koma heilt tætt at skíggjanum, eins og næmingurin, fyri at tað varð gjørligt at lesa spurningin. Svartir skíggjar er eisini eitt dømi um sjálvverju, tí onnur kunnu ikki fylgja við í tí, sum fer fram á skíggjanum. Tí við einum upprættum telduskíggja í skúlastovuni, gerst tað sjónligt í øllum rúminum, hvat ein hevur frammi á skíggjanum. Og fyri summi kann henda eksponering sýnast ágangandi, uttan mun til hvat ein hevur frammi á skíggjanum.

Danski forsætisráðharrin, Mette Frederiksen, vísti á sumri í ár í Fólkatinginum á, at tað ikki longur er ferðslan, sum er mest skaðilig fyri børn, men at tað er fartelefonin (Høj, 2023): "Jeg tror, der er en meget, meget, meget stor sammenhæng mellem det faktum, at vi aldrig nogensinde før har haft så mange børn, der ikke har haft det godt og så lige præcis denne her skærm."

## Talgilda lívið *er* veruliga lívið

Tá skúlabørnini vórðu biðin at viðmerkja, hvørjar aðrar lutir tey eiga, var Playstation ovast á listanum (228) og næst var Nintendo Switch (38). Aðrir lutir vóru VR (33), Nintendo (30), Applewatch (24) og snild ur (9).

Av lurtitólum til telefonir og teldur vóru AirPods (34) best umtókt. Tað, sum sæst aftur í svarunum, er, at tey, sum eiga spælikonsollir, eiga nógvar ymsar og fleiri eldri útgávur. Næmingarnir vórðu eisini biðnir at raðfesta tríggjar teir mest nýttu sosialu miðlarnar ella

teldupølini, sum tey brúka mest. Møguligt var at velja millum: Snapchat, TikTok, Roblox, Instagram, Facebook, Messenger, YouTube, Fortnite, Bereal, GTA (Grand Theft Auto), Minecraft, Discord ella "Annað". Tað er møguligt, at tað var betri, um kanningin bað næmingarnar raðfesta sosialar miðlar og telduspøl hvør sær, tí talan er um samskiftispallar og spøl, sum hava ymsar leiklutir í lívinum hjá børnunum. Kanningin vísti, at næmingar brúka mest Snapchat (28%), næst mest TikTok (28%) og síðani YouTube (22%).




Gjaldstovan gav í vár sínum starvsfólkum og løgtingsfólkum boð um at strika TikTok-appina á sínum arbeiðssnildfonum og -teldum av trygdarávum (Brend, 2023). Almenna frámælið sæst ikki at hava ávirkað nýtsluna hjá skúlabørnunum. Fyri skúlabørn er tað ikki bara vandi fyri njósning, sum ger at ansast skal eftir appini, tí gransking staðfestir, at tess fleiri tímar ein brúkar á sosialum miðlum, tess størri gerast sannlíkindini at verða fyri talgildum ágangi (Rostad, Basile, og Clayton 2021). Tí mæla hesir granskarar til at avmarka nýsluna av sosialum miðlum. Onnur kanning hevur eisini víst á sannlíkindi fyri, at brúkarar antin happa onnur ella gerast offur fyri talgildum ágangi (Ronis og Slaunwhite 2019).

Lívið er ein menningargongd, har vit broytast og fáa nýggjar og aðrar áhugar (Søndergaard v.fl. 2013). Samleikin hjá einum barni gerst alsamt meiri talgildur og varandi, og tað kann elva til ymsar trupulleikar. Á talgildum miðlum liggur ein møgulig eyðmýking "í allar ævir", og øll kunnu fyrr ella seinni fáa innlit í eina samrøðu, ella við filmsupptøku síggja eina hending. Tí gerst sárbærið størri og tíðarbilið longri, áðrenn ein kann javna ella burturbeina eina eyðmýking.

Ung taka ræðið á síni egnu forteljing við at sniðgeva tilfar um seg, sum vísur eina mynd, sum tey eru nøgd við. Á tann hátt leggja tey myndatilfar alment út um seg, og við sær í, sum vísir júst ta myndina, sum tey ynskja at onnur skulu síggja.

So hvørt sum talgilda tøknin mennist, er umráðandi at geva sær far um, júst hvussu samantvinnað veruliga lívið er við talgildu realtiónirnar, sum verða knýttar online (Mittmann v.fl. 2022). Talan er ikki bert um einfaldar samskiftishættir, men um relatiónir, sum síggjast aftur offline, har børn og ung hava møguleika fyri skjótt at fáa samband við sínar javnlíkar at knýta vinarbond.

## Ein nýggj spælimentan

Summir granskarar hava eyðmerkt unga ættarliðið við hugtøkum sum *net generation* (Tapscott, 1998), *digital natives* (Prensky, 2001), *the millennials* (Oblinger, 2003) og *screenagers* (Rushkoff, 2006). Við einum talgildum gerandisdegi kunnu myndatøkur og áhaldandi deilingar á eini snildtelefon fatast sum ein nýggj spælimentan (Niemelä-Nyrhinen og Seppänen 2021). Spæl eigur at bjóða inn til eina felags fatan av reglum fyri, hvat er stuttligt og hugnaligt. Tí spælið hevur sum endamál at skapa og styrkja vinarbond at menna samanhald, nærleika og álit.

Nýggj gransking vísir á, at online samskiftistól eru mennandi fyri vinaløg (Mittmann m.fl., 2022). Ung skyna ikki ímillum online og offline samskifti. Online samskiftistól og nýggj sløg av online spølum, rúma meiri enn ein samskiftisleiklut, og geva rúm fyri at skapa og menna vinaløg. Mittmann við fleiri meina tí, at tað er neyðugt at fata online samskiftistól, sum tól, sum fasilitera eina góða menning hjá ungdómi.

Tey, sum vóru happað á fartelefon ella á telduni, søgdu tað vera í fartelefonini (5%), á sosialum miðlum (6%) og í online spølum (5%). Hvørt svar varð útgreinað við frágreiðing. Flestu fráboðanir vóru um happing á Snapchat (81) Roblox (22) og Fortnite (18). Í viðmerkingunum hjá skúlabørnunum sæst, at útihýsing í online spølum ber brá av kynsmuni: *"Onkrir dreingir í Fortnite happaðu meg, tí eg var ein genta"*. Ein annar næmingur segði soleiðis: *"Eg blívi dripin, so skjótt sum eg komi inn, av spælarum, sum eg ikki kenni"*. Ein næmingur í 9. flokki vísti á møgulleikan at samantvinna undirhald og skúlating við at siga, at *"Roblox er á skúlateldunum, so eg kann spæla, ímeðan eg rokni"*.



**15%**

hava upplivað at verða hildin uttanfyri á sosialum miðlum

Í talvu 22 niðanfyri sæst, at samlað siga 66% seg ikki hava upplivað at verið hildin uttanfyri á sosialum miðlum og online spølum, ella at hava fingið særandi tilfar um seg ella onnur, á internetinum ella á fartelefonini. Verður hugt at muninum millum kynini sæst, at talan er um signifikantan mun: Gentur nýta meira sosialar miðlar enn dreingir. Dreingir nýta meira online spøl enn gentur. Hetta kynsbýtið endurspeglast við at har, sum gentur og dreingir eru mest á internetinum, er har, tey siga seg verða happaði. Eisini er tað týðiligt, at gentur í størri mun enn dreingir fáa særandi myndir ella filmsbrot sent av sær ella øðrum, enn dreingir.

Talva 22: Hevur tú hetta skúlaárið upplivað nakað av hesum? (Tú kanst velja fleiri) – býtt á kyn (Sp. 7.4).

| | 2023 | Gentur | Dreingir |
|---|---|---|---|
| At tú hevur verið hildin uttan fyri bólkum á sosialum miðlum (t.d. Snapchat) | 15% | 20% | 10% |
| At tú hevur verið hildin uttan fyri í online spølum (t.d. Fortnite) | 8% | 5% | 11% |
| At onkur hevur lagt særandi/keðiligar myndir/filmar av tær á internetið ella fartelefonina | 8% | 10% | 6% |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av tær til onnur | 10% | 14% | 6% |
| At onkur hevur sent særandi/keðiligar myndir/filmar av øðrum til tín | 11% | 14% | 8% |
| At onkur hevur hótt teg á internetinum ella í fartelefonini | 7% | 8% | 6% |
| Havi ikki upplivað nakað av hesum | 66% | 61% | 71% |
| Annað, hvat? | 5% | ns | ns |

Talgild happing ella *cyberbullying* er framhaldandi eitt týðandi fyribrigdi hjá børnum og ungum á sosialum miðlum. Lítið er granskað í, hvussu tey kenna ávirkan á egnan privatfrið og verju á alnótini og í tøknieindum (Milosevic m.fl., 2023). Nýtsla av sosialum miðlum kann broyta sosialiseringina hjá børnum, sum í stóran mun gerast alsamt yngri, tá tey byrja at brúka miðlarnar – hóast sosialu pallarnir vísa á 13 ára aldursmark. Kanning vísir, at børn niður í 6 ára aldur eru varug við sjónligar vandar, so sum *catfishing*, og uppliva óhepnar persónligar upplivingar á sosialum miðlum (Pescott, 2020). Skulu børn vera á sosialum miðlum, er neyðugt at arbeiða við og stuðla teimum í luttøkuni á hesum lívspallinum. Í Norðuramerika eru sosialir miðlar ein av mest nýttu sosialiseringspallunum hjá unglingum (Shade og Singh 2016). Tí meta Shade og Singh tað vera neyðugt at verja tann sosiala privatfriðin í mun til talgilda happing, sexting[1] og *informational privacy*. Hóast sosialir miðlar geva møguleika fyri at fáa samband við nógvar javnlíkar og menna relatiónir, so eru fleiri tannáringar, sum boða frá, at tey kenna seg útihýst, ella at verða sett í ein offurleiklut (*victimization*), tá tey nýta sosialar miðlar (Perry, Devore, Pellegrino, & Salce, 2023).

Gransking hevur víst, at tað er skilagott at skipa heildarætlanir, sum eitt proaktivt samstarv millum foreldur og skúla. Av tí at sosialir miðlar eru ein so stórur partur av lívinum hjá skúlabørnum, er harumframt neyðugt at heilsufrøðingar á skúlum hava gott innlit í talgilda happing, so til ber at fyribyrgja og verja næmingarnar (Byrne, Vessey, og Pfeifer 2018). Orsøkin er, at talgild happing hevur stóra ávirkan á heilustøðuna hjá barninum og at fólkaskúlin hevur eitt serstakt høvi at fremja fyribyrging – serstakliga við avgerðandi leiklutinum hjá einum heilsufrøðingi, at bøta um heilsustøðuna (Kim, Walsh, Pike, & Thompson, 2020).

Frágreiðingin hevur víst á fleiri kanningarúrslit, sum vísa, at hóast størsti parturin av skúlabørnunum siga seg ikki vera happað á talgildum miðlum, so eru nøkur, sum kunnu hugsast at hava stórar avbjóðingar og hava tørv á hjálp.

Úrslitini í hesi kanning vísa hvussu torgreitt og samansett ávirkanin av talgildu nýtsluni er á bæði sosial, didaktisk og fakig viðurskifti, og sum tí krevja nærri lýsing og kanningar.

---

[1] Sexting er at senda, móttaka og víðarisenda seksuell boð, myndir ella filmar, serstakliga í fartelefonum.

Tilmælini í hesi frágreiðing, eru, við støði í kanningini, latin fyri at stuðla skúlamyndugleikum í at fyribyrgja happing og fremja trivnað. Eisini á teimum talgildu lívspallunum, sum, fyri mong, eru ómissandi partar av lívinum. Hóast fleiri talgildir lutir og skipanir ikki eru partur av skúlanum, er tó alneyðugt, at skúlin er ein virkin luttakari í menningini av tí talgildisbúgving, sum allir framtíðar borgarar hava fyri neyðini.

## 7. Háttalagið

Fylgibólkur varð settur av Barna- og útbúgvingarmálaráðnum og varð umboðaður av:

- BÚMR: Jenny Lydersen, Joan Knudsen, Høgni Warberg
- NÁM: Eyðun Gaard og Tóra Petersen
- Undirvísingarstýrið: Hjalmar Hansen
- Føroya lærarafelag: Jákup Eli S. Olsen
- Sernám: Margreth Olsen
- Heim og Skúli: Janus Vang
- Skúlaleiðarafelagið: Jonleif Johannesen
- Fólkaskúlaráðið: Vagn Foldbo
- Fróðskaparsetrið:
    - Námsvísindadeildin: Erla Olsen, Katrin av Kák og Laufey H. Blaasvær
    - Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi: Annika Helgadóttir Davidsen

Kanningin varð framd í viku 9-12, á 38 skúlum kring alt landið. Innsavnarar vóru: Annika Klein, Femja Miné Jacobsen, Silja Joensen, Hallur Ljósstein, Elsa Maria Højgaard Hansen, Irena Tróndheim, Fríði Stenberg Olsen, Erla Olsen og Laufey H. Blaasvær.

Undirvísingarstýrið lat yvirlit yvir allar fólkaskúlar, og hesir vórðu í fleiri umførum bidnir at veita kunning um, hvørja atgongd næmingarnir høvdu til egnar teldur ella flokssett. Eisini varð spurt um, nær tað lá fyri at fáa vitjan.

Vitjanir á summum skúlum vórðu fluttar í samband við innsavningina vegna vánaligt veður. Men eisini vóru tað avbjóðingar í innsavningini í samband við KT-umlegging av netinum á skúlum, páskaroynd, verkætlanarviku, Skúlaleikir, starvsvenjing og námsferðir. Harumframt vóru næmingar í feriu, og nógv sjúka gjørdi um seg í øllum skúlunum - alt hetta hevur ávirkað luttøkutalið. Í einum føri varð farið aftur á ein skúla at vitja, tí ov nógvir næmingar vóru sjúkur tann dagin, kanningin varð gjørd.

Fyri at kunna samskifta neyvt og greitt við skúlaleiðslur, flokslærarar, foreldur, næmingar og hjálparfólk í innsavningini, varð heimasíðan 579.fo ment til kanningina. Heimasíðan gjørdi tað lætt hjá næmingunum at finna kanningina fram, har tey ovast á síðuni fingu atgongd at luttaka í kanningini. 38 skúlar luttóku. og hvør skúli varð stovnaður sum brúkari á síðuni við egnum brúkaranavni og loyniorði. Á henda hátt bar til at skipa

kanningina skynsamt, soleiðis at allir skúlar høvdu avmarkaða atgongd tann dagin, tá kanningin varð gjørd á hvørjum skúla sær. Innsavningartoymið sást á heimasíðuni 579.fo, og hvør innsavnari varð eyðmerktur við sín skúla, sum vitjað var í.

Undan innsavningini varð ein pilot-kanning gjørd á Skúlanum á Fløtum við 4., 6. og 8. flokki. Endamálið var at kanna, hvussu næmingarnir skiltu spurningarnar, umframt um tey tøkniliga megnaðu at nýta skipanina. Eftir pilot-kanningina vórðu summi orð broytt, fyri at økja um fatanina.

Í samband við innsavningina, vórðu allir innsavnarar bidnir um bert at fáa næmingar at skilja spurningin, og ikki at hjálpa teimum at svara. Hvør innsavnari fekk eitt handrit at halda seg til, áðrenn farið var undir at svara. Dentur varð lagdur á, at tey ikki spurdu hvønn annan, tí so kundi kanningin skeiklast við, at ein næmingur fekk tvær røddir, og ein næmingur onga. Næmingarnir vórðu undan kanningini upplýstir um, at tey luttóku anonymt. Smærri skúlar eru í greiningini lagdir saman í tríggjar bólkar, ein fyri teir í Sandoynni og Suðuroynni, ein fyri teir í Streymoy, umframt at smáskúlar í Eysturoy og Norðoyggjum eru bólkaðir saman. Hetta ger, at minsta næmingatalið sum verður greinað og upplýst, er 20. Fleiri av smærri skúlunum vóru so beinasamir at flyta seg inn á størri skúlar, og onkur kom inn á Námsvísindadeildina. Hetta góða samstarv við skúlaleiðslurnar gjørdi tað smidligt at fremja kanningina, og eiga tey stóra tøkk fyri sítt hjálpsemi.

Í samband við innsavningina vóru bert innsavnarar frá Fróðskaparsetrinum til staðar í flokshølinum, umframt tulkar og stuðlar. Í einstøkum førum vístu lærarar sína ónøgd við ikki at kunna vera í flokshølinum í samband við kanningina. Viðmerkt varð ein ótti um, at innsavnarar høvdu møguleikan at ávirka svarini. Í øðrum førum sást inni í skúlastovunum, at lærarar beint undan vitjanini høvdu arbeitt við evinum happing og útihýsing, tí tað sóust lepar hangandi í floksstovuni um rættan atburð og á talgildu talvuni.

Ein villa kom í samband við innsavningina. Hvalbiar skúli var ikki var á listanum av skúlum, og tí vórðu næmingar í Hvalbiar skúla bidnir at velja Tvøroyar skúla. Við tað at kanningin er anonym, var eingin beinleiðis møguleiki at finna svarini frá Hvalba aftur, tó varð ein roynd gjørd við støði í svarinum uppá, hvussu nógvir næmingar ganga í flokkinum, tí floksstøddin á báðum skúlunum er sera ymisk. Onkur villa kann tó vera íkomin vegna hetta. Eisini er vert at viðmerkja, at fyri at svara spurningurin um sosialar miðlar og telduspøl, var bert gjørligt at velja tey trý mest nýttu. Næmingar í 5.flokki gjørdu vart við, at tey ikki nýttu

nakað á listanum. Tí var rættari, um skúlabørnini høvdu valmøguleikan tríggjar ferðir at velja "onki". Í slíkum førum vórðu tey biðin um at velja "annað" sum fyrstu raðfesting og viðmerkja at enda, at tey ikki brúka sosialar miðlar ella telduspøl, so tað varð gjørligt at finna tey aftur og strika teirra val av sosialum miðlum og telduspølum.

## Hagtølini

Til innsavningina varð skipanin SurveyXact nýtt, hetta er ein góðkend skipan, sum Fróðskaparsetrið nýtir, og sum tryggjar, at vit lúka tær ásetingar og treytir, sum GPDR setir til dátutrygd. Skipanin í SurveyXact varð sett upp til at savna inn dátur anonymt. Hóast hetta, so vórðu næmingarnir spurdir um, hvørjum skúla tey gingu á, og hetta kundi hava við sær, at onkur næmingur í onkrum lítlum skúla kundi verið eyðmerktur. Tí vórðu dáturnar úr SurveyXact sum tað fyrsta broyttar soleiðis, at smáskúlarnir vórðu settir saman í størri bólkar, og minsti bólkurin av næmingum, hvørs svar vórðu greinað, var sum áður nevnt 20 næmingar.

At greina svarini hagfrøðiliga er nýtt forritið SPSS (versjón 29 til Windows). Heilir árgangir eru spurdir, og tølini eru ikki vektað. Fyrst vórðu gjørdar nakrar yvirskipaðar greiningar at vita, hvussu ymsu spurningarnir eru knýttir hvør at øðrum. Við støði í hesum yvirskipaðu greiningum eru dáturnar frágreiddar, og tey tøl sum verða víst í hesi frágreiðing eru so at siga øll grundað í krosstabuleringum. Allar talvur og grafar eru gjørdar við støði í úrslitum frá SPSS.

Tilsamans 38 skúlar luttóku í kanningini. Teir skúlar, sum ikki eru við, hava ikki næmingar í 5., 7. og 9. flokki. Hesir skúlar eru, eins og í kanningunum í 2015 og 2019, til summar greiningar bólkaðir í skúlastøddir, við støði í uppgerð frá Mentamálaráðnum fyri næmingatalið í fólkaskúlanum 2022/23. Býtið er soleiðis: 1-99 næmingar eru smáir skúlar, 100-299 næmingar eru miðalstórir skúlar, og 300 og fleiri næmingar eru stórir skúlar. Tølini eru viðgjørd, eftir at minstu skúlarnir (við færri enn 20 svargevum) eru bólkaðir í størri bólkar, fyri at tryggja svargevunum navnloysi.

Tvey ófullfíggjað svar eru, har onkur villa hevur gjørt, at tey ikki hava upplýst, hvørjum skúla tey ganga í. Hesi bæði svarini eru við í øllum greiningum, uttan har skúlin og skúlastødd eru viðgjørd.

Næmingarnir í serflokkunum hava ikki luttikið í kanningini uttan so, at teir vóru partur av vanligu flokkunum, tá kanningin fór fram.

Samanlagt svaraðu 1698 næmingar spurningunum. Hetta svarar til 83% av samlaða næmingatalinum í skúlaárinum 2022/23. Svarluttøkan er nakað lægri enn í seinastu kanning, tá hon var 90%. Serliga er tað luttøkan í 9. flokki, sum dregur niður. Tá hugt verður eftir einstøku skúlunum, sæst, at hóast onkrir skara framúr, so er lág luttøku í 9. flokki eitt fyribrigdi í flestu skúlum. Næmingatal og luttøka sæst í talvuni niðanfyri:

Talva 23: Luttøkuprosent í trivnaðarkanningini 2023

| | 5. flokkur | 7. flokkur | 9. flokkur | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Næmingar tils. | 662 | 683 | 702 | 2.047 |
| Luttøka | 566 | 594 | 538 | 1698 |
| Munur | 96 | 89 | 164 | 349 |
| Luttøkuprosent | 85% | 87% | 77% | 83% |

Hóast luttøkuprosentið er lægri enn í kanningini frá 2018/19, so er hetta framvegis ein høg svarluttøka, sum eigur at geva eina rímiliga greiða og eftirfarandi mynd av støðuni. Í fylgiskjali 4 síggjast prosenttølini fyri svarini til spurningarnar frá hesi nýggjastu kanningini.

Endamálið við kanningini er at fylgja við trivnaðinum hjá føroyskum fólkaskúlanæmingum, um tilmælini frá 2019 eru sett í verk, og um so er, um átøkini so virka. Eins og í kanningini frá 2019 eru skúlarnir eyðmerktir, og tí kunnu skúlar fáa egnu úrslit í samráð við Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Nám.

Kanningin er kvantitativ við nøkrum opnum spurningum. Spurningar frá eldri kanningum ganga aftur, samstundis sum eisini nýggj evni eru tikin upp. Í hesi nýggju kanningini eru eisini tikin við didaktisk viðurskifti, umframt at spurt verður um online spøl og sosialar miðlar.

Henda frágreiðing leggur fram høvuðsúrslitini frá kanningini, men enn eru nógv viðurskifti, sum ikki eru greinað og viðgjørd.

## 8. Keldulisti


Akselvoll, M. Ø. (2022). *Det grænseløse forældreskab*. Dansk Psykologisk Forlag.

Bateman, A., & Fonagy, P. (2019). *Handbook of Mentalizing in Mental Health Practice*. American Psychiatric Association Publishing.

Bengtsson, J., Dich, N., Rieckmann, A., & Rod, N. H. (2019). Cohort profile: The DANish LIFE course (DANLIFE) cohort, a prospective register-based cohort of all children born in Denmark since 1980. *BMJ Open*, *9*(9), 1–8. https://doi.org/10.1136/bmjopen-2018-027217

Børne- og Undervisningsministeriet. (2023). Faglig trivsel - skoleåret 2022/2023.

Brandtzæg, I., Torsteinson, S., & Øiestad, G. (2017). Folkehelse og livsmestring i skolen. *Tidsskrift for Norsk psykologforening*, *55*(8), 766–767.

Brend, S. H. (2023). Løgtingsfólk og onnur almenn starvsfólk skulu strika TikTok. Hentet fra https://kvf.fo/node/153366

Brinkmann, S. (2011). *Fællesskab i skolen Udfordringer og muligheder*. Akademisk Forlag.

Brinkmann, S. (2015). *Identitet : udfordringer i forbrugersamfundet*. Århus: Klim.

Brinkmann, S. (2017). *Det diagnosticerede liv - sygdom uden grænser*. Klim.

BÚMR. (2023). *Fólkaskúlalógin, broytingar - Tilmæli frá arbeiðsbólki*.

